EF-arbeiðsbólkurin
Postsmoga 1287
110 Tórshavn

Telefon 13028
Telefax 10459

# Føroyar og EF

## Útlit fyri samvinnu

Frágreiðing latin
Føroya Landsstýri
14. juni 1991

1. partur

1142-3 104/90

INNIHALDSYVIRLIT


| | | | |
|---|---|---|---|
| A. | SAMANDRÁTTUR OG TILMÆLI | Síða | 1 |
| | 1. Alment um frágreiðingina | | 1 |
| | 2. Annað tilfar og upplýsingar | | 2 |
| | 3. Samandráttur um møguligar samstarvsmøguleikar Føroya og EF ímillum | | 2 |
| | 4. Forðingar ímóti útlendskum kapitali v.m. | | 5 |
| | 5. GATT | | 5 |
| | 6. Framhaldandi viðgerð av EF-málinum | | 6 |
| B. | ARBEIÐSBÓLKURIN OG VIRKSEMI HANSARA | | 7 |
| | 1. Arbeiðsbólkurin | | 7 |
| | 2. Setningur | | 7 |
| | 3. Virksemi | | 7 |
| | 4. Fyrsta frágreiðing | | 8 |
| | 5. Arbeiðsumstøður | | 8 |
| C. | GONGDIN 1973 - 1991 | | 11 |
| | 1. Verandi skipan við EF | | 11 |
| | 2. Aðrar skipanir við EF | | 13 |
| | 3. Gongdin í Europa síðan 1973 | | 14 |
| | 4. Gongdin í Føroyum síðan 1974 | | 15 |
| | a. Fiskiskapur | | 15 |
| | b. Fiskavirking | | 16 |
| | c. Ídnaðurin | | 17 |
| | d. Niðurstøða | | 17 |
| | 5. Samráðingar um nýggja skipan við EF | | 18 |
| | 6. EFTA-londini royna at ganga saman um ætlanina um Europeiskt Búskaparligt Samstarv, og rakna kortini upp av ymiskum áhuga og tørvi á tættari samgongu við EF | | 19 |

D. ÚTGREININGAR FRÁ VIRKJUM, STOVNUM OG FELØGUM — Síða 21

1. **Føroya Fiskasøla** 22
2. **Føroya Reiðarafelag** 24
3. **Føroya Havbúnaðarfelag** 26
4. **Føroya Ídnaðarfelag** 27
5. **Føroya Prentsmiðjueigarafelag** 28
6. **Havsbrún** 28
7. **Føroya Jarðarráð** 29
8. **Føroya Bjór** 30
9. **Miklagarður/SMS** 30
10. **P/F Poul Hansen / P/F Krás** 30
11. **Fróðskaparsetur Føroya** 31
12. **Landsskúlafyrisitingin** 31
13. **Heilsufrøðiliga Starvsstovan** 33

E. RÍKISRÆTTARLIGA STØÐA FØROYA 35

1. **Inngangur** 35
2. **Støðan hjá triðjalondum** 35
3. **Framíhjárættindi innan EF** 35
4. **Handilsavtalur** 35
5. **Fríhandilsavtala** 35
6. **Tollsamtøka** 36
7. **Associering** 36
8. **EF-EFTA: Europeiskt Búskaparligt Samstarv (EBS)** 36
9. **Limaskapur** 37
10. **Frágreiðing frá danska uttanríkisráðnum** 37

F. EF OG FRAMTÍÐARÚTBYGGING AV EF 39

1. **Inngangur** 39
2. **Vørur frítt at fara** 39

   2.1 **Tollsamgonga** 39
   2.2 **Innmarknaðurin** 39
   2.2.1 **Avtøka av fysiskum eftirliti við markini** 39
   2.2.2 **Avtøka av tøkniligum handilsforðingum** 39
   2.2.3 **Javnføring av momsi og gjøldum** 39

3. **Arbeiðsmegi frítt at fara** 39
4. **Kapitalur frítt at fara og frítt at seta virki á stovn** 40
5. **Rómarsáttmálin § 7** 40
6. **Felags landbúnaðar- og fiskivinnupolitikkur** 40

| | | | |
|---|---|---|---|
| | 6.1 | Felags landbúnaðarpolitikkur | Síða 40 |
| | 6.2 | Felags fiskivinnupolitikkur | 40 |
| | 6.2.1 | Varðveitan av fiskastovnum | 41 |
| | 6.2.2 | Marknaðarskipanin | 41 |
| | 6.2.3 | Strukturpolitikkurin | 42 |
| | 6.2.4 | Avtalur við triðjalond | 42 |
| 7. | | Felags avtalur við triðjalond | 42 |
| 8. | | Felags Økispolitikkur | 42 |
| 9. | | Stovnar undir EF | 42 |
| | 9.1 | EF-ráðið (Ráðharraráðið) | 43 |
| | 9.2 | EF-nevndin | 43 |
| | 9.3 | EF-dómstólurin | 43 |
| | 9.4 | EF-tingið | 43 |
| | 9.5 | EF-lóggávan | 43 |
| | 9.5.1 | EF-fyriskipanir | 43 |
| | 9.5.2 | EF-direktiv | 43 |
| | 9.5.3 | EF-samtyktir | 43 |
| 10. | | Framtíðarútbygging av EF | 44 |
| | 10.1 | Inngangur | 44 |
| | 10.2 | Búskaparligt- og peningaligt samveldi | 44 |
| | 10.3 | Politiskt samveldi | 44 |
| | 10.4 | Nærleikameginreglan (Subsidiaritetsprincippet) | 44 |
| | 10.5 | Øki við tjóðskaparligum sjálvsavgerðarætti | 44 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| G. | | NEYÐUGAR TILLAGINGAR Í FØROYSKUM VIÐURSKIFTUM Í SAMBANDI VIÐ YMIST TÆTTARI SAMBAND VIÐ EF | 45 |
| 1. | | Inngangur | 45 |
| 2. | | Sáttmáli um fríhandilsskipan | 45 |
| | a. | Lógartillagingar | 45 |
| | b. | Búskaparligar avleiðingar av eini fríhandilsskipan | 47 |
| | c. | Metingar hjá Føroya Fiskasølu um uppskotið um fríhandilshandilsskipan | 47 |
| | d. | Metingar hjá Føroya Havbúnaðarfelag um uppskotið um fríhandilsskipan | 48 |
| | e. | Eftirlit við heilsuligu dygd á útfluttum matvørum | 49 |
| | f. | Kanningar og metingar av avleiðingunum av uppskotinum um fríhandilsskipan á innflutningskappandi vinnuna í Føroyum | 49 |
| | g. | Reglur um uppruna á vørum | 50 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | h. | Reglur um landskassastuðul og antidumping | Síða 50 |
| 3. | Tollsamgonga | | 51 |
| | a. | Inngangur | 51 |
| | b. | Lógartillagingar | 51 |
| | c. | Búskaparligar avleiðingar av tollsamgongu | 51 |
| 4. | Associering ella onnur serskipan | | 52 |
| | a. | Inngangur | 52 |
| | b. | Lógartillagingar | 52 |
| | c. | Búskaparligar avleiðingar | 53 |
| 5. | Serstøk føroysk EBS-skipan við EF - ella EBS-skipan við EFTA-limaskapi | | 53 |
| | a. | Inngangur | 53 |
| | b. | Lógartillagingar | 54 |
| | c. | Búskaparligar avleiðingar | 54 |
| 6. | Føroyskur limaskapur í EF | | 55 |
| | a. | Inngangur | 55 |
| | b. | Lógartillagingar | 56 |
| | c. | Búskaparligar avleiðingar | 59 |
| | d. | Fiskivinnupolitikkurin | 60 |
| | e. | Fíggingarvinnurnar | 61 |
| | f. | Telesamskifti | 61 |
| | g. | Beinleiðis búskaparligir fyrimunir av EF-limaskapi | 61 |
| | h. | Gjøld til EF | 62 |
| | i. | Serskipanir í sambandi við EF-limaskap | 62 |

H. SKJØL

| | |
|---|---|
| 1. | Innihaldsyvirlit, 2. partur, Svar frá virkjum, stovnum og feløgum |
| 2. | Innihaldsyvirlit, 3. partur, Útgreiningar frá danska uttanríkisráðnum tættir A - F |
| 3. | Innihaldsyvirlit, 4. partur, Kunningar 1 - 16 Útgreining frá Valuta- og Prísráð Føroya |

**EF-arbeiðsbólkurin**
**Postsmoga 1287**
**110 Tórshavn**

**Telefon 13028**
**Telefax 10459**

# A. SAMANDRÁTTUR OG TILMÆLI

## 1. Alment um frágreiðingina

Útgreiningin av teimum spurningum, ið feløg, virki og stovnar hava reist í sambandi við eina møguliga fríhandilsavtalu millum Føroyar og EF, verður við hesum latin landsstýrinum.

Við frágreiðingini var upprunaliga ætlað at kanna og umrøða øll viðurskifti, ið kundu hugsast at hava føroyskan áhuga í sambandi við felagsmarknaðin. At gera hetta út í æsir er ógjørligt, og serliga ikki eftir einans 7-8 mánaðum. Men harumframt eru tættir, ið EF-arbeiðsbólkurin ikki hevur tikið upp, eitt nú fulla politiska samgongu millum EF-londini við felags verju- og uttanríkispolitikki.

EF-arbeiðsbólkurin hevur í arbeiði sínum serliga lagt seg eftir at lýsa teir spurningar, ið taka seg upp av vinnuligum og búskaparligum slag í viðurskiftunum við EF, og bólkurin heldur, at við hesum vali eru spurningar av útbúgvingarligum, granskingarligum og mentanarligum slag ikki tiknir fram og umrøddir í tann mun, ið teir áttu.

Frágreiðingin er annars býtt í 4 partar, nevniliga henda 1. part, ið dregur samanum og viðger tað tilfar, sum er í 2., 3. og 4. parti, og tað rúgvismikla tilfar, ið bólkurin annars hevur havt á hondum.

Í hesum 1. parti verður í punkti B greitt frá virkinum hjá arbeiðsbólkinum og í punkti C frá søguligu gongdini í EF og í Føroyum. Í punkti D verður í høvuðsheitum greitt frá teimum útgreiningum og viðmerkingum, ið komnar eru frá feløgum, virkjum og stovnum, meðan arbeiðsbólkurin í punkti E eitt nú við støði í 3. parti í stuttum tekur saman um ríkisrættarligu støðu okkara. Punkt F greiðir stutt frá um EF í dag, teimum seinastu broytingunum, ið kunnu fáa týdning fyri okkum, og um væntaðu gongdina í felagsskapinum næstu árini. Í punkti G viðger arbeiðsbólkurin hvørjar tillagingar verða neyðugar í føroyskum viðurskiftum við ymsum tilknýti til EF.

Í 2. parti eru tær viðmerkingar ljósprentaðar, ið komu inn frá feløgum, virkjum og stovnum, eftir áheitan landsstýrisins, dagfest 30. apríl og 15. august 1990, og eftir áheitan bólksins, dagfest 7. november 1990.

Í 3. parti, skiftur í 6 tættir, A - F, eru útgreiningarnar, ið fingnar eru frá danska uttanríkis-

ráðnum, ljósprentaðar saman við áheitanum bólksins á feløg, virki og stovnar um viðmerkingar teirra til hesar útgreiningar, og innkomnu svarini. Aftast í 1. parti er fullfíggjað yvirlit yvir einstøku skjølini í 3. parti, og fremst í hvørjum tátti er yvirlit yvir skjølini í táttinum.

Í 4. parti eru tær 16 EF-kunningarnar, ið bólkurin náddi at skriva. Her er eisini tikin við útgreining frá Valuta- og Prísráði Føroya um handilskapping innan EF sambært Rómarsáttmálanum, greinunum 85-94.

## 2. Annað tilfar og upplýsingar

Tó at tilfarið, ið við hesum verður lagt fram, er rúgvismikið og víðfevnt, so er hópur av tilfari, ið bólkurin hevur fingið, ikki tikið við her. Eitt nú fylgdu við útgreiningunum frá danska uttanríkisráðnum bøkur, bóklingar og annað serligt tilfar, ið bólkurin hevur latið tí stovni hjá landinum, ið mátti haldast at hava mest gagn av hesum. Og av ferð síni í Íslandi hevði arbeiðsbólkurin tilfar heim við, ið eisini er latið landsstýrinum beinleiðis.

Men støðugt kemur nýtt tilfar fram um EF, virki og ætlanir tess, og bóklingar og bøkur um hetta kunnu fáast bíliga frá "Informationskontoret om De Europæiske Fællesskaber" í Keypmannahavn ella frá Schultz Forlag í Keypmannahavn. Í báðum støðum ber eisini til at fáa lógir, fyriskipanir og direktiv frá EF og uppskotini um hesi, so títt og knapt tey eru tilevnað.

Tað hevur verið borið upp á mál, at serlig skrivstova í Føroyum átti at havt fullfíggjað savn av øllum hesum tilfari, og at feløg, virki, stovnar og einstaklingar kundu vent sær hagar at fingið tað tilfar teimum tørvaði, ella betur, at skrivstovan kunnaði hesi um nýggjar reglur og broytingar, ið kunnu fáa týdning. EF-arbeiðsbólkurin heldur at landsumsitingin hjá okkum eigur støðugt at fylgja væl við í øllum lógarsmíði hjá EF, so hon í góðari tíð kann taka stig til neyðugar tillagingar í okkara lógarverki. Men arbeiðsbólkurin heldur eisini, at feløg, virki og stovnar hava sjálvkravda skyldu sjálv at fylgja við í teimum lógum og reglum, ið kunnu ávirka teirra virkismøguleikar. Í sínámillum samstarvi og í samstarvi við samstarvsfelagar í EF kann góð hjálp vera fingin um tað, sum krevst at vita.

EF-arbeiðsbólkurin royndi í apríl at skipa fyri skeiði um, hvussu og hvar upplýsingar um EF kunnu vera fingnar, serliga í teimum dátugrunnum, sum er skipaðar til slíkt endamál. Peningur at halda slíkt skeið fekst ikki tá, men arbeiðsbólkurin vónar, at Føroya Handilsskúli og menningarstovan í felag fáa skipað fyri slíkum skeiði til heystar. Fyri virki, vinnufelagsskapir og ráðgevingarstovur av ymsum slag átti slíkt skeið at havt stóran áhuga, umframt fyri skúlar, bókasøvn og almennar stovnar.

## 3. Samandráttur um møguligar samstarvsmøguleikar Føroya og EF millum

Í skrivi sínum, dagfest 7. november 1990, bað EF-arbeiðsbólkurin virki, stovnar og feløg í Føroyum siga sína hugsan um teir vansar og teir fyrimunir, tey mettu fóru at vera fyri teirra virksemi, um vit fingu eina av hesum skipanum: **fríhandilsavtalu, tollsamgongu, limaskap í EF ella triðjalandsstøðu mótvegis EF**. Síðan hava aðrir møguleikar stungið seg upp, eitt

nú ein samstarvsháttur líkur tí, ið EFTA samráðist um, ella ein sonevnd associeringsskipan.

Skulu vit her stutt greiða frá innkomnu svarunum, frá innihaldinum í útgreiningunum frá danska uttanríkisráðnum og tí, ið bólkurin sjálvur hevur lagt fram í sínum almennu kunningum um hesar samstarvsmøguleikar, so er at nevna:

**Limaskapur** er tann samstarvsháttur, ið gongur longst og gevur føroyskum kappingarførum vinnuvirkjum størstu møguleikar. Men limaskapur krevur nógv tær størstu tillagingarnar í føroyskari vinnu og samfelagi sum heild. Tað er tó til hetta at viðmerkja, at føroysku skipanirnar hvat viðvíkur frælsi hjá arbeiðsmegi at koma, hjá kapitali at koma og hjá útlendingum at seta virki á stovn í Føroyum, so eru tær longu í roynd og veru so frælsar, at tað einans snýr seg um formligar broytingar at fáa tær í samsvar við EF-reglur.

Einki bendir á, at yvirræðið á fiskivinnuøkinum og fiskivinnupolitikkinum verður flutt úr Brússel og til limalondini ella partar av teimum. Her verður stýringin framvegis í Brússel, har EF-ráðið fer at avgera innihaldið. Hesi viðurskifti fara at viga tungt á vágskálini ímóti limaskapi.

Danska uttanríkisráðið vísir á, at í verandi ríkisrættarligu støðu er føroyskur limaskapur bert hugsandi gjøgnum danska limaskapin. Við hesum verða møguleikar-nir fyri egnari ávirkan rættiliga skerdir í mun til støðuna sum er. Hetta ger heldur ikki limaskap trúligan.

Ein **fríhandilsskipan** gevur hvørki limaskapsfyrimunir ella -vansar. Fríhandilsskipan í tí líki, ið uppskot nú er um, gevur bert trygd fyri avmarkaðum møguleikum, hvat viðvíkur menning av okkara fiskaídnaði. Við henni verður neyðugt at fremja nógvar tillagingar, ið kortini skulu gerast, men hon ber ikki í sær, at vit sleppa ræðinum á fiskivinnuøkinum, ella noyðast at broyta ríkisrættarligu støðuna. Við teimum broytingum, ið fara fram í Europa, er tó trúligast, at vit skjótt vilja hava hana broytta til aðra, víðgongdari skipan.

Í **tollsamgongu** verður farið longur í handilsskipanini enn í einari fríhandilsskipan. Kann hon fevna fult um fiskavørur, men ikki um landbúnaðarvørur, so er hesin samstarvsháttur ein, ið hevði hóvað okkum væl, tí tá høvdu vit framvegis ræðið á fiskivinnuøkinum og høvdu óbroytta ríkisrættarliga støðu.

Tann **EBS-skipan**, ið EFTA-londini samráðast um við EF, er ikki umrødd í svarunum frá virkjunum, og danska uttanríkisráðið hevur heldur ikki gjørt stórvegis burtur úr henni. Hon setir Danmark í ta støðu, at Danmark vegna Føroyar skal vera limur í EFTA, samstundis sum Danmark er limur í EF. Hetta kann fáa Danmark at aftra seg við at taka upp sum møguleika.

EBS-skipanin ella ein serskipan, ið knýtir Føroyar uppí, er tó kanska tann, ið vildi hóvað føroyska samfelagnum sum heild best, fingust somu treytir á fiskivinnuøkinum og hvat handilsskapi við fiskavørum viðvíkur, sum Ísland kann taka við. Fram um fríhandilsskipanina og tollsamgonguna leggur hon lunnar undir samstarv á útbúgvingar-, granskingar- og mentanarøkinum, ið annars bert kunnu fáast við

limaskapi.

Av teimum **serskipanum og associeringsavtalum**, ið annars eru, heldur bólkurin, at tær heilt nýggju **POSEICAN og POSEIMA**-skipanirnar fyri Kanariaoyggjarnar, Madeira og Asorurnar eru av stórum áhuga. Hesar skipanir eru gjølliga umrøddar í tilfarinum frá danska uttanríkisráðnum, sbr. 3. part, men í stuttum verður eftir hesum nýggja støðan, at EF viðurkennir, at fjarar oyggjar hava sjálvsagdan tørv á positivari serviðgerð.

Oyggjarnar liggja sum vit langt frá teimum ríkjum, tær eru partar av, og í so máta eru tær í somu støðu sum vit. Tær vórðu tó umfataðar av limaskapinum hjá ávikavist Spania og Portugal, tá tey fóru inn, meðan vit enn eru uttanfyri.

Tað eigur tó at viðmerkjast, at meðal inntøkan fyri hvønn íbúgva har er sera lág, langt undir meðal fyri EF sum heild. At nýta hesar reglur sum fyridømi í okkara samráðingum er tó sjálvsagt, ið hvussu so er, tá tað snýr seg um fyribils og varandi undantøk.

Innihaldið og avleiðingarnar av frammanfyrinevndu skipanum fyri okkara vinnumøguleikar og búskap er gjølliga umrøtt í øllum pørtum av frágreiðingini, og verður serliga víst til punktini D, E, F og G í 1. parti. Tað hevur tó ikki verið gjørligt at skilt greitt ímillum tær tillagingar, ið vit undir øllum umstøðum noyðast at gera, og teir trupulleikar, ið vit noyðast at basa, sama hvat samstarv vit velja.

Tað hevur ikki verið uppgávan hjá EF-arbeiðsbólkinum at vísa á, hvat samstarv best kann fáa okkum úr okkara truplu støðu og samstundis tryggja okkum javnbjóðis góðar framtíðarmøguleikar sum okkara næstu grannar. Uppgávan hevur verið at leggja fram teir fyrimunir og teir vansar, ið eru í hvørjum møguleika. Ikki valið teirra millum.

Tá hetta er sagt, kann arbeiðsbólkurin ikki bara sær at siga, at uttan so at samfelagið alt tekur megnartøk at menna grundleggjandi førleikarnar hjá virkjum, stovnum og starvsfólki í leiðslu, skipan, samstarvi, effektiviteti og viðkomandi útbúgving og gransking, so kann tað gera tað sama, hvat samstarv vit fáa við EF. Okkara høvuðstrupulleikar kunnu bert loysast í Føroyum av føroyingum sjálvum.

Verandi samráðingar um eina fríhandilsskipan eru nú komnar á tað vegamót, har vit mugu taka støðu til eitt uppskot, ið gevur okkum ávísar nýggjar møguleikar, men samstundis avmarkar aðrar týðandi møguleikar, ið vit í 18 ár hava havt, men av løtuvinningi ikki hava troytt. Velja vit at vraka uppskotið, kunnu vit kanska vóna at sleppa at samráðast um eina tillaging av verandi skipan, ið partvíst letur okkum varðveita teir møguleikar, ið vit fingu í 1974, at menna okkara ídnað. Verða hesir møguleikar líka misskiltir og illa nýttir sum higartil, so er tó lítil fongur í hesari loysn. Men tað mest trúliga er, at EF tá uttan samráðingar hevði givið okkum einhvørja skipan, ið líkist gomlu skipanini ella uppskotinum um fríhandilsskipan, tó við fleiri avmarkingum.

Hvørgin skipan loysir tó teir átrokandi útbúgvingar-, granskingar- og mentanarspurningarnar.

Eitt samstarv, líkt tí EFTA-londini samráðast við EF um, hevði latið dyr opnar á útbúgvingar-, granskingar- og mentanarøkinum. Men enn bendir einki á, at henda skipan millum EF og EFTA, um hon kemur í lag nú í juni, verður ein varandi loysn. Flestu av verandi EFTA-londum hava hug at fara upp í EF, og EFTA má so umskipast til ein forgarð til EF, har limirnir vera menningarlond í Eystureuropa, ið brynja seg til fullan limaskap. Harumframt verður so Ísland, ið heldur limaskap vera óhugsandi, so leingi yvirræðið á fiskivinnu og undirgrund skal liggja í Brússel.

Tá ið tað snýr seg um vinnuspurningar, eru vit í sama báti sum Ísland. Bera EFTA/EF samráðingarnar ikki á mál, ið Ísland kann góðtaka, er mangt, ið bendir á, at Føroyar eiga at umhugsa munandi nærri samstarv við Ísland til tess at finna loysn á eitt nú fiskivinnuspurningunum. Tá liggur einki fordømi frá Íslandi/EFTA/EF, ið vit kunnu nýta í komandi avtalum millum Føroyar og EF, og einsæris føroyskur limaskapur í EF er eins hættisligur fyri okkum sum fyri Ísland, tá ið hugsað verður um okkara náttúrutilfeingi.

Ríkisrættarliga støða okkara ger, at spurningurin um limaskap má umhugsast álvarsliga, áðrenn hann kemur upp á tal. Í einari av útgreiningunum frá danska uttanríkisráðnum verður víst á, at limaskapur bert fæst gjøgnum ríkisfelagsskapin, og møguleikarnir fyri sjálvstøðugari ávirkan tá verða rættiliga avmarkaðir. Ávirkan er tó ikki bert ein formligur spurningur, men í nógv størri mun ein spurningur um innlit, vitan og medvirkan, og tí ber ikki til at hugsa sær nakra týdningarmikla ávirkan í sjálvstøðugum tilknýti hjá Føroyum einsamøllum. Eitt EFTA/EF-líkt samstarv hevði tí heldur ikki verið nøkur varandi loysn, vóru vit ikki í limaskapi í samstarvi við hini EFTA-londini.

## 4. Forðingar fyri útlendskum kapitali o.a.

EF-arbeiðsbólkurin er í sínum kanningararbeiði komin eftir, at av norðurlondum eru Føroyar eitt tað frælsasta land hjá útlendskum kapitali at leita til. Her eru ongar veruligar avmarkingar hjá útlendingum at keypa jørð, virki og skip.

Slíkar forðingar í hinum norðurlondunum elva til trupulleikar í samráðingunum um EBS-skipan, og Danmark stríðist enn við at varðveita regluna um keyp av summarhúsgrundum.

Hvørt tað er rætt at seta slíkar skipanir í verk nú í Føroyum, ið eins og íslendsku forða fyri útlendskum keypi av landbúnaðarjørð, fiskavirkjum og fiskiskipum, er ein politiskur spurningur, ið helst eigur at verða viðgjørdur skjótt, um nakað skal verða gjørt við hann.

Við so frælsum skipanum fyri arbeiðsmegi, kapitali og vinnuvirkjum at koma inn í landið skuldi ein hildið, at føroyska samfelagið annars var opið úteftir. So er ikki. Á eitt nú útbúgvingarøkinum, og hvat gransking viðvíkur, tykjast vit at leggja vaksandi forðingar fyri okkara ungu at fáa altjóðakappingarførar útbúgvingar.

## 5. GATT

EF-arbeiðsbólkurin hevur í sínari frágreiðing gjørt lítið burtur úr tí týdningi, ið væleydnaðar GATT-samráðingar kunnu fáa í sambandi við EF sum fiskavørumarknað. Verandi

landbúnaðarskipan í EF ger, at EF hevur hægri matvøruprísir - eisini á fiski - enn við landbúnaðarskipan líkari teirri amerikonsku.

Hetta er vert at hava í huga, tá ið samstarvsmøguleiki verður valdur, sjálvt um EF við sínum dynamikki, ríkidømi og, í løtuni, einum 350 mió. íbúgvum altíð verður ein týðandi marknaður.

## 6. Framhaldandi viðgerð av EF-málinum

EF-arbeiðsbólkurin heldur seg hava rokkið setta setningi. Men samstundis ræður hann landsstýrinum og stovnum tess og vinnuvirkjum og felagsskapum teirra meira enn higartil sjálv at kunna seg um EF og altíð hava eyguni eftir, hvat hendir innan EF, hvønn týdning og hvørjar avleiðingar og hvørjar møguleikar, hetta ber við sær.

At dúva einans á Christiansborg ella Asiatisk Plads, tá ræður um upplýsingar, kann ikki í longdini bera til. Tí var fyri góðum ári síðani frammi, at vit áttu at fingið egnan Lóka í Brússel.

Hesum tiltaki hjá vinnuvirkjum og felagsskapum teirra tekur EF-arbeiðsbólkurin fult undir við. Um landsstýrið peningaliga hevði stuðlað eitt slíkt tiltak í byrjanini, hevði ikki verið av leið, men bólkurin heldur, at slíkur stuðul eigur ikki at verða varandi.

Tórshavn, tann 14. juni 1991

Kjartan Kristiansen

Arne Poulsen

Henning Holten

Jákup í Gerðinum

Páll Nielsen

Niels á Velbastað

## B. ARBEIÐSBÓLKURIN OG VIRKSEMI HANSARA

### 1. Arbeiðsbólkurin

Løgmaður, Jógvan Sundstein, kallaði hin 24.oktober 1990 umboð fyri stovnar, virki og feløg o.o. - tilsamans møttu eini 60 fólk - til fundar á Hotel Hafnia, har tey kundu gera vart við seg í spurningum viðvíkjandi eini fríhandilsavtalu við EF. Á fundinum boðaði løgmaður frá, at hann ætlaði at seta ein arbeiðsbólk við 5 limum. Hesir vóru:

Jákup í Gerðinum, fyrisitari í Føroya Handverksmeistarafelag
Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni
Páll Nielsen, advokatur hjá Føroya Arbeiðarafelag
Arne Poulsen, skrivari í Føroya Arbeiðsgevarafelag
Niels á Velbastað, landsstýrisfulltrúi og skrivari hjá arbeiðsbólkinum.

Eftir uppskoti frá Óla Jacobsen, formanni í Fiskimannafelagnum, Jákupi Jacobsen frá Fiskasøluni og Uffa Bærentsen, formanni í Ídnaðarfelagnum varð Henning Holten, stjóri í P/F Ráðgevarafelagnum á Glaðsheyggi, eisini valdur í arbeiðsbólkin, ið so taldi 6 mans.

### 2. Setningur

Setningur hjá landsstýrinum var, at arbeiðsbólkurin skuldi greina teir spurningar, ið fyrsta lagi vinnufeløgini hava reist í sambandi við samráðingarnar við EF um fríhandilsavtalu. Annars álegði fundurin bólkinum at kanna og umrøða øll viðurskifti, ið hugsast kundu at hava føroyskan áhuga í sambandi við felagsmarknðin.

### 3. Virksemi

**Fundir:** Arbeiðsbólkurin hevur hildið fund regluliga hvønn mánadag fyrrapart. Harafturat hava aðrir fundir verið eftir tørvi. Tilsamans hevur bólkurin hildið einar 40 fundir.

Fundir hava verið við umboð fyri Føroya Fiskasølu, Bacalao, Sjóvinnubankan og Føroya Banka. Somuleiðis hava fundir verið við Árna Olafsson, Tryggva Johansen, Leiv Gregersen, Jalgrim Hilduberg og Per Vinther, stjóra á EF-skrivstovuni í Keypmannahavn.

Eftir áheitan frá EF-arbeiðsbólkinum, um løgmann, hava danska uttanríkisráðið og hinar ráðharrastovurnar lýst tann partin av politikkinum hjá EF, ið hevur týdning fyri Føroyar. Eitt yvirlit yvir hesar rúgvismiklu frágreiðingar stendur í 1. parti, og alt tilfarið er í 3. parti.

Danska uttanríkisráðið var so beinasamt at senda Preben Seiersen, skrivstovustjóra, saman við Árna Olafssyni higar at hava fund við arbeiðsbólkin um tilfarið.

Sum heild var arbeiðsbólkurin væl nøgdur við tilfarið, ið tær ymsu ráðharrastovurnar høvdu gjørt. Har okkurt skortaði, skuldu Preben Seiersen og Árni Olafsson síggja til at útvega hetta.

Preben Seiersen segði annars, at eitt av teimum positivu tingunum, ið var komið burtur úr landsstýrisins áheitan, var, at fólk á donsku ráðharrastovunum raknaðu við og funnu útav, at nakað eitur Føroyar.

Á fundinum við Preben Seiersen og Árna Olafsson vóru eisini Jalgrim Hilduberg, skrivstovustjóri, Sigurd Poulsen, landsbankastjóri, Brúsi Johansen frá Fróðskaparsetrinum og Gunvør Hoydal, deildarleiðari á Landsskúlafyrisitingini, ið fingu høvi at greiða frá sínum starvsøki og umrøða ymsar spurningar.

**Kanningar:** Í skrivi dagfest 7.november 1990 vórðu meira enn 150 feløg, virki og stovnar biðin at boða arbeiðsbólkinum frá hvørjar fyrimunir og vansar, ið teirra felag/virki/stovnur hevði av ávikavist verandi tilknýti til EF og við øðrum skipanum við EF. Nakað líkt skriv sendi landsstýrið feløgum og virkjum hin 30. apríl 1990. Tíverri svaraðu bert eini 40, íroknað tey, ið svaraðu landsstýrinum. Úrslitið av hesi kanning er viðgjørt í 1. parti í punkt D, og upprunatilfarið er í 2. parti.

Ein arbeiðsbólkur við fólkum úr Fiskasøluni og Føroya Banka, hevur kannað avleiðingarnar av ymsum møguligum handilsavtalum við EF. Úrslitið er lýst í punkti D undirpunkt. 1: Føroya Fiskasøla.

Í døgunum 20. - 22.mars 1991 var arbeiðsbólkurin í Reykjavík og kunnaði seg við tær fyrireikingar, sum íslendska vinnulívið og samfelagið annars ger, koma teir í búskaparligt samstarv (EBS) við EF (sí 16. kunning).

**Kunningar:** Arbeiðsbólkurin setti sær fyri sum sítt fyrsta mál at kunna regluliga í bløðunum um EF. Hesin kunningarpartur var ætlaður vanliga føroyinginum. Kunningarnar eru í 4. parti í hesi frágreiðing.

## 4. Fyrsta frágreiðing

Heldur enn at bíða til ein fullfíggjað frágreiðing varð liðug, valdi arbeiðsbólkurin hin 1. februar 1991 at senda partar av arbeiðinum fram. Hildið varð, at tann fyrsta frágreiðingin vildi fremja almenna og politiska orðaskiftið um okkara framtíðar viðurskifti við EF.

Sjálv frágreiðingin hevur onga viðgerð fingið í fjølmiðlunum, men vit halda, at frágreiðingin - og serliga fyrireikingararbeiðið - hevur hjálpt feløgum at fáa eina betri fatan av EF - spurningum. Hetta sæst í teirra aðalfundarfrágreiðingum.

Annars eru tað serliga lærarar og næmingar í framhaldsdeildini, á handilsskúlum og á HF- og studentaskúlum, ið hava víst okkara arbeiði áhuga og fegin vilja havt kunningarnar sum undirvísingartilfar.

## 5. Arbeiðsumstøður

Allir limirnir í arbeiðsbólkinum hava dagliga sítt fulla starv at røkja og kunnu bert nýta avmarkaða tíð í arbeiðsbólkinum. Sama er galdandi fyri skrivaran í bólkinum, ið eisini ofta

er uttanlands í embætisørindum. Í hesum sparitíðum hevur landsstýrið ikki kunnað veitt arbeiðsbólkinum nakran stuðul til lønta skrivarahjálp. Hetta kemur sjálvandi at seta sín dám á frágreiðingina, ið fer at vera merkt av, at nógvir kokkar hava verið uppií. Heldur ikki hevur verið ráð at løna fólki at rættlesa frágreiðingina. Hetta er spell, men fær tíverri ikki verið øðrvísi. Vónandi fær lesarin kortini gagn av frágreiðingini.

C. GONGDIN 1973 - 1991

**1. Verandi skipan við EF**

Eftir at Danmark hevði gjørt av at fara inn í EF, samtykti Føroya løgting tann 9. apríl 1973, "at føroysk luttøka í EF undir verandi treytum, serliga hvat fiskirættindunum viðvíkur, ikki er ráðilig". Samstundis legði løgtingið á landsstýrið at gera sítt til, "at EF's reglur um fiskirættindi verða broyttar, so tær betur samsvara tørvinum hjá økjum og londum, har fiskivinnan er av avgerandi týdningi og aðrir vinnumøguleikar avmarkaðir".

Høvuðssjónarmiðini viðv. skipan av fiskirættindum fyri lond og landspartar í Norðuratlantshavinum (her varð hugsað um Grønland, Hetland, og Orkneyoyggjarnar innanfyri EF og Føroyar, Ísland og Norðurnoreg uttanfyri EF) vóru í stuttum,

at íbúgvarnir í londunum og landspørtunum undir skipanini skulu hava framíhjárætt til fiskarí á leiðum uttan fyri 12 fjórðinga fiskimarkið.

at sínámillum veiðirættindi fyri íbúgvarar í londunum og landspørtunum skulu fyriskipast í sáttmálanum. Fyri Føroyar, sum í stóran mun eru bundnar til fjarfiskiskap á umrøddu leiðum, er spurningurin um sínámillum veiðirættindi av alstórum týdningi.

at seravtalur skulu gerast við umrøddu lond, ið ikki eru uppi í EF fyri at tryggja rímuligar sølu- og forsýningstreytir. Hetta sipar til, at londini uttan fyri EF skulu fáa lagaligar tolltreytir í EF, og tað vil samstundis bøta um møguleikarnar hjá EF at fáa fisk og fiskavørur, sum trot ofta er á.

at samarbeiðið um at varðveita og endurreisa fiskastovnin í Norðuratlantshavinum verður økt.

Harumframt vóru tvinni sjónarmið, ið sipa til lond og landspartar, ið eru uppi í EF,

at EF skal geva stuðul til útbygging av fiskivinnuni í viðkomandi londum og landspørtum, og

at EF skal lata stuðul til neyðugar broytingar, ið standast av, at ávís øki í EF verða rakt av, at traditionelt fiskarí skal minkast.

Úrslitið av hesum royndum landsstýrisins og donsku ríkismyndugleikanna, herundir at longja umhugsunartíð Føroya bóru ikki á mál, og samtíðis fingu Svøríki, Noreg og Ísland fríhandilsskipanir við EF, ið bóru í sær, at føroyska vinnan kendi seg verri fyri.

Eingi útlit vóru til, at meira fekst við at bíða fulla trý-áraskeiðið við støðutakan til limaskapsspurningin, og Føroya løgting samtykti tí 25. januar 1974 einmælt soljóðandi:

* Landsstýrið boðar ríkisstjórnini frá, at heimastýrið ikki kann mæla til føroyska luttøku í EF.

* Landsstýrið tekur upp samráðingar við ríkismyndugleikarnar og EF um viðskifti Føroya við EF.

* Úrslitið av samráðingunum verður lagt fyri løgtingið.

Samráðingarnar vóru lidnar til ólavsøkutingsetuna sama ár, og úrslitið varð lagt fyri løgtingið tann 8. august 1974, herundir sum hjálagt skjal "Rådets forordning (EØF) Nr. 2051/74 af 1. august 1974 om en toldordning for visse varer med oprindelse i og indført fra Færøerne".

Í EF-ráðsskipanini verða m.a. hesar viðmerkingar til skipanina førdar fram:

"Rådet erklærede i sin resolution af 4. februar 1974, at det for at fremme Færøernes eksport til Fællesskabet nu er indstillet på at vedtage foranstaltninger med sigte på gradvist at afskaffe tolden på import af varer med oprindelse i og udført fra Færøerne, og som er væsentlige for øernes økonomiske og sociale udvikling; i denne resolution erkendte Rådet ligeledes, fiskeriets livsvigtige betydning for Færøerne, og erkendte at fiskeriet og dertil knyttede industrier på grund af den geografiske beliggenhed, som dette område af kongeriget Danmark har, er af afgørende erhvervsmæssig betydning for befolkningen, idet de øvrige beskæftigelsesmuligheder er meget begrænsede; ved samme lejlighed erklærede Rådet sig interesseret i at Fællesskabet bidrager sit til udviklingen på Færøerne, og at det derfor var rede til på baggrund af resultaterne af Søretskonferencen, at tage de afgørende faktorer for den økonomiske og sociale udvikling i dette område af kongeriget Danmark op til fornyet overvejelse;"

Úrslitið av samráðingunum var væl móttikið og fyrimunirnir fyri Føroyar mettir eyðsýndir. Teir vóru í høvuðstættum samanfataðir soleiðis:

- 80% tolllætti fyri flestu fiskavørur - minni og meira viðgjørdar - umframt fyri allar ídnaðarvørur til EF.

- varðveiting av tollfríum útflutningi til Danmarkar fyri allar føroyskt framleiddar vørur av føroyskum uppruna.

- tollfrælsi í Bretlandi fyri flestu fiskavørur undir skipanini.

- onga skyldu til skerjing av framleiðslutreytunum fyri føroyska ídnaðin. Hetta saman við tolllættanum í EF kann fáa avgerandi týdning fyri uppbygging av øðrum ídnaði enn fiskiídnaði í Føroyum.

Landsstýrið viðmerkti harumframt, at týdningurin av skipanini var ikki bert, "at ávísar vørur nærum sleppa heilt undan tolli, ella at tollfrælsið verður konsoliderað, har tollurin í løtuni er fyribils avtikin. Týdningurin er eftir landsstýrisins metan í fult so stórt mát, at tolllætti er fingin fyri nú høgttollaðar vørur sum súrgað sildafløk og meira viðgjørdar fiskavørur, tí hetta vil stimbra og skunda undir føroyska framleiðslu av slíkum vørum."

Uppskot til lóg um lækking av innflutningsgjøldum orsakað av skipan fyri samhandilin millum Føroyar og Felagsmarknaðin var tískil samtykt við 26 - 0 atkvøðum í løgtinginum.

Men tað er júst henda skipan, við teimum fáa og smáu ábótunum síðan 1974, ið kann væntast sett úr gildi í seinasta lagi 31. desember 1992, tá innmarknaðurin gerst endaligur veruleiki.

**2. Aðrar skipanir við EF**

Umframt frammanfyri nevndu tollskipan hava Føroyar ikki aðrar skipanir við EF uttan á fiskivinnuøkinum.

Bæði í Føroyum og í EF-londunum varð fiskimarkið flutt út á 200 fjórðingar 1. januar 1977. Samstundis samtyktu EF-londini at leggja myndugleikan at stýra fiskivinnuni upp í hendurnar á EF, m.a. við tí úrsliti, at tað var EF og ikki tey einstøku limalondini, ið kundi gera avtalur við onnur lond um fiskirættindi.

Í mars 1977 varð ein sonevndur rammusáttmáli gjørdur millum Danmark og Føroyar øðrumegin og EF hinumegin um sínámillum fiskiveiðu. Hesin sáttmáli líkist teimum rammusáttmálum, ið EF hevur gjørt við onnur triðjalond.

Tó verður í fortaluni til rammusáttmálan víst til Føroya støðu sum sjálvstýrandi partur av limalandinum Danmark, og EF viðurkennir, at Føroyar eru ógvuliga heftar at fiskivinnuni.

Partarnir átaka sær at geva fiskiførum hjá hvørjum øðrum veiðirættindi, sum eftir samráðing verða ásett fyri eitt ár í senn.

Í rammusáttmálanum er onki ásett, ið kann knýta nakað samband ímillum veiðirættindi og tollsømdir fyri fiskavørur.

Støðið ( í toskaekvivalentum) í sáttmálanum er minkað síðan 1977, men hevur síðan 1982 verið støðugt. Sjálvt um vit høvdu varðveitt stóran part av okkara silda- og makrelveiðu í EF-sjógvi, so hevði týdningurin av hesum fiskiskapi verið lutvíst minkaður orsakað av, at prísurin á sild og makreli ikki hevur fylgt prísinum á øðrum fiskasløgum.

Standandi uttanfyri EF hava føroyingar kunnað gjørt egnar avtalur við triðjalond, bæði við slík sum EF hevur havt sáttmála við, eitt nú Noreg, og slík, sum EF ikki hevur havt sáttmála við, t.d. Sovjetsamveldið, DDR, Ísland og Kanada.

Hvussu stórur okkara partur í norskum sjógvi hevði verið, vóru vit EF-limaland, er ilt at meta um, men hinar kvoturnar høvdu neyvan verið til.

So sum heild má metast, at okkara støða uttan fyri EF hevur gjørt okkum førar fyri at útvega okkum størri fiskiveiðimøguleikar enn innanfyri. Her eru tó ikki tiknir við teir møguleikar, sum EF-lond hava fyri at fiska á meira fjarskotnum høvum.

Rammusáttmálin var upprunaliga settur í gildi fyri 10 ár og kundi síðan halda fram seks ár í senn. Hann er í 1990 longdur í seks ár afturat.

**3. Gongdin í Europa síðan 1973**

Talið á limalondum í EF er økt:
Síðan 1973 er limaskarin í EF vaksin úr upprunaligu 6 í 12 lond í dag. Europeiski felagsmarknaðurin fevnir nú út við 350 mió. fólk, og bruttotjóðaúrtøkan í EF er næstan komin ájavnt hana í USA og er dupult so stór sum tann japanska.

Týdningurin av oljukreppuni í 1973:
Fyrsta oljukreppan bar í sær eitt afturstig fyri ætlaðu samanrenningina í EF. Krøvini um tillagingar eftir oljukreppuna vóru so stór, at limalondini løgdu størri dent á egnar loysnir enn at finna felagsloysnir innan EF í tillagingunum.

Fiskaripolitikkurin verður fastlagdur í EF í 1983:
Umframt tollsamgonguna vóru felags landbúnaðarpolitikkur og felags fiskivinnupolitikkur grundvøllurin undir felagsmarknaðinum. Fiskivinnupolitikkurin var tó ikki fastlagdur fyrr enn í 1983, eftir at havrættindini til 200 míla búskaparlig øki vóru viðurkend í 1977. Partar av fiskivinnupolitikkinum vóru sum kunnugt tó fastlagdir í 1970 og aðrir partar í sambandi við upptøkurnar av Danmark og Stórabretlandi í felagsmarknaðin.

Felagsaktin og innmarknaður:
Við felagsaktini frá 1985 hevur EF fingið sett elvuliga gongd aftur á ta samanrenning millum limalondini, ið fyrsta oljukreppan í 1973 steðgaði. Tað tykist sum um gongdin fram ímóti veruliga innmarknaðinum, sum jú frá byrjan hevur verið eitt aðalmið fyri EF, verður alt skjótari fyri hvønn dag.

Eystureuropeisku londini eru vorðin frælsari og Týskaland er aftur sameint:
Sum frá líður fara stóru broytingarnar í Eystureuropa at geva limalondunum í EF ein stóran, nýggjan marknað har. Í fyrstu syftu tó so at broytingarnar í uppbygging og umleggingin til marknaðarbúskap bera stóran kostnað við sær og krevja stórar íløgur, og hesar útreiðslur vera ein byrða fyri Týskaland og EF. Men fleiri av eystureuropeisku londunum hava eisini áhuga fyri nærri tilknýti til EF; nøkur ynskja sum frá líður limaskap.

Alt gongur ímóti búskaparligari og gjaldoyrissamgongu og ímóti politiskari samgongu í EF:
Gongdin í samanrenningini í EF hevur tikið eitt skarvslop, eftir at málið um innmarknað í 1993 varð sett. Hesin dynamikkur hevur eggjað hugin at menna enn nærri samanrenning við skipan av búskaparligari og peningaligari samgongu og skipan av fullari politiskari samgongu. Á toppfundinum í Rom í desember seinasta var tí gjørt av, at tveir fundir millum stjórnirnar í limalondunum skuldu evna til uppskot um hesar samgongurnar. Alt bendir á, at áðrenn farið verður inn í ár 2000, hevur EF tikið avgerð um at skipa hesar báðar samgongurnar. Einasta, ið tykist at kunna seinka einari slíkari gongd, er eitt búskaparligt bakkast av sama slagi og av sama týdningi, sum kom við fyrstu oljukreppuni.

## 4. Gongdin í Føroyum síðan 1974

### a. Fiskiskapur

Sum ein náturlig fylgja av, at flestu lond fluttu teirra fiskimørk út á 200 fjórðingar aftaná 1977, er okkara fiskiskapur undir Føroyum vaksin frá at vera ein lítil partur av heildarvirðinum upp í helvt.

Hetta skuldi fyri so vítt verið ein ynskilig gongd, at vit sjálvir hava fingið ræðið á týdningarmiklasta tilfeingi okkara, og at mesti parturin av útflutningi okkara stavar hagani.

Fram til 1975 varð fiskivinnan stuðlað á ymiskan hátt, t.d. við stuðli til minstuløn, til íløgur o.t. Í sekstiárunum varð sett á stovn almenn prísáseting á ráfiski, har prísirnir, ið vórðu ásettir 14. hvønn dag, vórðu grundaðir á marknaðarprísirnar á útflutninginum og á útreiðslurnar hjá virkjunum. Tá prísirnir fullu serliga nógv á vári 1975 orsakað av marknaðarviðurskiftunum, fóru útróðrarmenn í verkfall.

Verkfallið hevði við sær, at gjørd varð ein sonevnd heildarloysn, og settur varð á stovn Ráfiskagrunnurin. Skipanin við Ráfiskagrunninum førdi til, at beinleiðis sambandið millum marknaðarprís og ráfiskaprís datt burtur. Settir vórðu tveir prísir: avreiðingarprísir (til skipini/bátarnar) og avrokningarprísir (tað virkini skuldu gjalda fyri fiskin). Munurin millum báðar prísirnar skuldi gjaldast úr Ráfiskagrunninum.

Endamálið við Ráfiskagrunninum var av fyrstan tíð at veita fiskimonnum javnan fiskaprís. Hetta endamál má sigast at vera rokkið, men hinvegin so hevur gongdin verið og serliga seinnu árini, at játtanin til Ráfiskagrunnin er ógvusliga vaksin fyri at prísirnir kundu haldast. Summi ár hevur verið neyðugt við samlaðari játtan til fiskivinnuna, sum svaraði til umleið fimtingin av fíggjarlógini.

Tá føroyingar í stóran mun mistu fiskirættindi í fremmandum sjógvi árini eftir 1977, legði eitt stórt tal av skipum um til feskfiskaveiðu undir Føroyum, og heilt fram til fyri einans trimum árum síðani var frítt hjá øllum føroyskum skipum at veiða undir Føroyum.

Hetta saman við veðhaldum til íløgur, prísstudningum úr Ráfiskagrunninum, øðrum prísstudningum, rakstrar- og manningarstudningum, minstaforvinningsskipanum og øðrum studningum hevur ført við sær eina ógvuliga stóra veiðiorku til fiskiskap undir Føroyum.

Úrslitið er, at neyvan nakrantíð hava botnfiskastovnarnir undir Føroyum verið so illa fyri sum nú.

Niðurstøðan má tí verða, at okkara støða uttanfyri EF hevur tryggjað føroyskum fiskimonnum rættin til at fiska undir Føroyum, men hetta hevur hinvegin ikki hjálpt um umsitingina av okkara tilfeingi. Enn hava vit ikki lært at umsita okkara fiskiríkidømi, men avgerðarrættin og skylduna av støðuni hava bert vit sjálvir.

**b. Fiskavirking**

Ein av orsøkunum til, at føroyingar vóru fegnir um handilsskipanina við EF var tann, at vit fingu góðar tollsømdir fyri tilvirkaðan fisk, men ikki fyri rundan, feskan fisk.

Hetta hevur verið ein týðandi vernd hjá flakavirkjunum, og er eisini ein miðvís útbygging av flakavirkjunum farin fram síðan.

Nógv hevur verið funnist at, at flakavirkini ikki eru nóg effektiv í teirra framleiðslu, bert eru undirleverandørar av hálvlidnum vørum, ikki leggja seg nóg væl eftir at framleiða dygdarvørur o.s.fr.

Vit eiga tó ikki at gloyma, at innan flakavinnuna í Føroyum hevur valdað ein sera nágreinilig stýring. Her verður hugsað um, at tað vegna politiska stýring finnast nógvar smáar eindir, og yvirkapasiteturin er stórur. Rættiliga stóran part av flakavirkjunum hevur tað almenna (kommunur og løgting) sett partapening í og givið veðhald. Tvørrandi kappingarumstøður hava ikki eggjað til menning av leiðslunum á virkjunum, ið koyrdu í gomlum sporum við stórum íløgum í maskinur og amboð, men ikki í skipan, arbeiðsmegi og effektiviteti. Hetta hevur havt við sær, at vinnan ikki hevur konsoliderað seg á nakran hátt, og tí ikki hevur havt orku til at gera íløgur í t.d. vørumenning og marknaðarføring. Eisini hevur hákonjunkturur innanlands valdað seinastu 20 árini, og sera ringt hevur verið at fingið kvalifiseraða arbeiðsmegi at arbeiða í fiskiídnaðinum. Hetta samanumtikið hevur gjørt, at flakavirkini bert hava verið før fyri at havt einklar framleiðslur.

Tað hevði verið náttúrligt, at aftaná so nógv ár við vernd, áttu flakavirkini at verið før fyri at framleitt meira av nógv viðgjørdum fiskavørum, og eisini at innflutt fremmanda rávøru til víðari framleiðslu.

Tað eru tó tekin til, at vend er komin í tey seinastu tvey árini, soleiðis at effektiviteturin á einstøkum virkjum er munandi batnaður, og at farið er undir at framleiða meira viðgjørdar vørur; og hóast tollin á feskum fløkum er hesin útflutningur eisini øktur.

Fyri framtøku innan fiskavirking hava flutningsmøguleikarnir rættiliga nógv at siga. Uttan hóskandi flutningsmøguleikar ber illa til at menna framleiðslur til marknaðirnar. Tá USA var ein týdningarmikil marknaður fyri frystar vørur, víðkaðust flutningsmøguleikarnir hagar, men stóra kappingin at flyta vørur inn frá meginlandinum hevurført við sær, at flutningsmøguleikarnir fyri flutningi av feskum vørum, tá henda tók seg upp fyrst við aldum laksi, til Europa hava enn ikki tikið seg upp nóg væl. Tær royndir, ið hava verið gjørdar, hava annaðhvørt ikki verið nóg góðar ella hava ikki verið nóg væl undirbygdar fíggjarliga.

At tað hóast alt ber til at hava kappingarførar vinnur í Føroyum, bendir framleiðslan á pilkaðum rækjum í Føroyum á. Hetta er ein vinna, sum er í fríari kapping við aðrar, og sum ikki fær studning. Í sama viðfangi skal nevnast fiskiskapur eftir og framleiðslan úr jákupsskel.

Sum triðja dømi kunnu vit nevna alingina. Tað skal ikki verða sagt, at hon ikki fær nakran studning, men tað er nógv sum bendir á, at hon kanska fær minni hjálp enn í londunum rundanum okkum. Nú hon er sloppin undan tí neyvu stýringini, hon hevur verið undirløgd, sær út til, at henni nokk skal verða lív lagað.

Eisini hesi dømini benda á, at tað helst man vera av sjálvgjørdum ávum, at vit hava so stórar trupulleikar í okkara fiskivinnu. Tó hetta skal ikki á nakran hátt skiljast soleiðis, at vit ikki skulu geva okkara vinnu bestu umstøður - tvørturímóti skal vinnan hava minst líka góðar sømdir sum tær, vit kappast við.

**c. Ídnaðurin**

Vísandi til grundgevingarnar hjá løgtinginum í 1974, at vit framhaldandi kunnu verja føroyskan ídnað og harvið kunnu byggja upp annan ídnað enn fiskiídnað í Føroyum, so hevur hetta eydnast í ávíst mát, tó grundstøðið ídnaðurin stendur á tykist rættiliga veikt.

Lønarútgjaldingin fyri ídnaðin burtursæð frá fiskiídnaðinum var í 1989 116 mió. kr., t.v.s. 4% av teimum samlaðu lønútgjaldingunum, og vóru seks tær størstu greinarnar innan ídnaðin hesar:

matvøruframleiðsla
prenting og útgáva
byggitilfarsframleiðsla
evnavøruframleiðsla
grót- og betongvøruframleiðsla
gerð av veiðireiðskapi
brygging og mjólkarframleiðsla

Í høvuðsheitinum er tað so, at ídnaðurin í Føroyum er vardur við umleið 20% av søluprísinum, undantikið tey virki, ið framleiða til fiski- og alivinnuna, bryggjaríir og partar av prentframleiðsluni.

Bert við smávegis undantøkum hevur tað ikki eydnast hesum virkjum at gera seg galdandi á útlendskum marknaðum. Orsøkirnar eru helst fleiri, men tað er einki at ivast í, at trupulleikin at fáa arbeiðsmegi, effektivitetur, kostnaðarstøði og lágt leiðslustøði eru nakrar av orsøkunum.

Tað eru herumframt serlig viðurskifti, ið koma at virka rættiliga darvandi fyri ídnaðin framyvir, og tað er tann næstan heilt manglandi uppbyggingin av vitanarstøðinum í Føroyum á teimum økjum, ið hava týdning fyri kappingarføri í framleiðslu av útgerð v.m. til fiskivinnu og fiskatilvirking. Føroysk fiskivinna og fiskiídnaður hevur at kallað latið tað fremsta av vitan og royndum til útlendskar framleiðslu- og ráðgevingarfyritøkur, meðan føroyskar fyritøkur ikki hava fingið gagn av hesum.

**d. Niðurstøða**

Tað er roknað út, at tann tollur, vit gjalda av okkara útflutningi til EF er 40-50 mió. kr. Samanbera vit hesa upphædd við studningin til fiskivinnuna, verjuna av føroyskum ídnaði og blokkstuðulin frá EF-limalandinum Danmark, so má sigast, at tollurin á føroyskum fiskavørum ikki er nakar stórur vansi; hann kann bert vera ein forðan fyri framleiðslu av ávísum vørum.

Sum heild kann sigast, at okkara fiskivinnuavtalur og handilsskipan við EF ikki kann hava verið nakar bági í sjálvum sær, hvørki fyri okkara fiskiskap, fiskaframleiðslu ella ídnað annars.

### 5. Samráðingar um nýggja skipan við EF

Eftir at EF í oktober mánaða 1988 hevði gjørt vart við, at felagsskapurin metti tað bráðneyðugt at finna fram til nýggja skipan millum Føroyar og EF, og eftir at Føroya landsstýri og marknaðarnevnd løgtingsins í august mánaða 1989 kom til, at ein fríhandilsavtala var tann skipan, ið hóvaði okkum best, hevur gingið striltið at fingið í lag eitt alment orðaskifti og eina gjølliga kanning av okkara verandi og komandi viðurskiftum mótvegis EF.

Felagsskapir hava eftirlýst upplýsingum og orðaskifti, og teir hava enn tá lagt upp til at vit fingu egnan Lóka í Brússel. Eftir uppskoti frá menningarstovuni vendi Føroya landsstýri sær 30. apríl 1990 til føroysk feløg, stovnar og virki og bað um teirra meting av hvat ein fríhandilsavtala bar við sær av fyrimunum og vansum og hvørjir spurningar við slíkari skipan kortini ikki vóru loystir. Longu tá bendi samráðingargongdin á, at tað fór at vera torført at fáa eina fríhandilsavtalu, ið vit kundu taka við. Kortini var trupult at koma til slíka niðurstøðu, so leingi samráðst varð.

EF-arbeiðsbólkurin kann ikki og kennir seg heldur ikki føra fyri at geva eina sanna mynd av samráðingunum og tí úrsliti, ið eftir øllum at døma fer at spyrjast burturúr. So mikið liggur tó longu nú alment greitt, at fyriliggjandi uppskot til fríhandilsavtalu verður einki kolumbusegg.

Tí er umráðandi neyðugt fyri føroysku myndugleikarnar at fáa allar møguleikar kannaðar fyri ymiskum tilknýti til EF, út frá hesum finna ta loysn, ið so breið semja kann fáast um sum til ber, og taka tey stig, ið geva okkum frægast burtur úr við valdu loysnini. Várið 1991 verður avgerandi í royndini at leggja komandi samráðingarleiðina, og fyri vinnulívið og samfelagið sum heild er tað bráðneyðugt at fáa avklárað okkara komandi kringumstøður.

Ein av teimum møguleikum, ið ikki hava verið umrøddir, síðan valt varð at biðja um eina fríhandilsavtalu, er samráðing um framhald av verandi skipan. Frammanundan var møguleikin mettur at geva ov lítið og annars hava aðrar óhepnar fylgjur. Sum nevnt frammanfyri undir C, a, varð henda skipan væl móttikin í 1974, og nevndir vóru fleiri fyrimunir. M.a. vísti landsstýrið á, at tolllætti var fingin á høgttollaðum vørum, so sum súrgað sildafløk og meira viðgjørdar fiskavørur. Í mun til núverandi uppskot til fríhandilsavtalu var høgur tollur á feskum, rundum fiski og lágur tollur á góðskaðum fiskavørum og eingin kvota. Verandi skipan leggur toll á fesk fløk og roykta vørur og aðrar vørur sum saltaða brosmu og upsafars. Men spurningurin er, um verandi skipan, har tollur eisini verður á útflutningi til Danmarkar, ikki gevur betri møguleikar fyri menning enn nýggja uppskotið. Í samráðingunum um varðveitslu av verandi skipan, eigur tollfrælsið til Danmarkar og lági tollurin til Bretlands og Írlands at virka lækkandi á tollin til EF annars. Samráðingarnar kundu so snúð seg um hetta og um at fingið onkrar batar í skipanini til okkara fyrimuns. Hetta kundi kanska verið frægasta úrslitið at fingið burturúr principiellu støðu Danmarkar um at tollur ikki eigur av verða millum tveir partar av ríkinum.

**6. EFTA-londini royna at ganga saman um ætlanina um Europeiskt Búskaparligt Samstarv, og rakna kortini upp av ymiskum áhuga og tørvi á tættari samgongu við EF.**

At Danmark, Stóra Bretland og Írland tóku seg úr EFTA og fóru inn í EF, fekk ikki so stóran týdning fyri eftirverandi EFTA-londini beinanvegin, tí oljukreppan støðgaði gongdini innan EF tey fyrstu mongu árini, og flestu EFTA-londini fingu fríhandilsavtalur við EF. Men so hvørt eftirvirkanin av oljukreppuni hasaði av og samanrenningin tók dik á seg aftur, vísti tað seg neyðugt at taka neyvari samstarv upp. Luxemborg-yvirlýsingin í 1984 var byrjanin, har handilsmálaráðharrarnir í EFTA og EF samdust um at virka fyri europeiskum búskaparligum samstarvsøki, ið umfatar tey 18 EFTA- og EF-londini. Í hesum øki skal vera frítt at fara hjá vørum og tænastum, og neyvt samstarv skal vera landanna ímillum á málsøkjum sum t.d. búskaparpolitikkur, gransking, umhvørvisvernd, ferðamannamál og mentanarspurningar. Luxemborg-yvirlýsingin bygdi á samstarv sak fyri sak, men við skjótu og miðvísu gongdini innan EF bar hetta samstarv skjótt ov stutt. Í mars 1989 kom tí Oslo-yvirlýsingin undan EFTA-EF uttanríkisráðharrafundinum 20. mars. Delors hevði lagt út í januar sama ár, og EFTA-londini gjørdu greitt, at tey vóru til reiðar at fremja "í størst møguligan mun frælsi hjá vørum, tænastum, kapitali og persónum at fara um landamark við tí miði at skapa eina dynamiska europeiska búskaparliga eind við samsipaðum reglum." EFTA-londini vildu ganga inn fyri "menning av samstarvinum eisini á økjum, ið ikki beinleiðis eru partar av innmarknaðinum". Heldur ikki henda gongd tykist vera nóg skjót fyri EF, tí gongdin í EFTA-londunum er langt frá so dynamisk sum í EF. Einstøku EFTA-londini byrja tí hvørt sær at miða ímóti limaskapi í EF, ið EF ikki tykist sinnað at geva teimum, fyrr enn innmarknaðurin er væl og virðiliga komin upp á pláss.

Í desember seinasta er semja komin um, at samráðingarnar um EBS-skipanina skulu vera lidnar í seinasta lagi í juni mánaða í ár, og úrslitið av hesum verður av rættiliga stórum týdningi fyri okkum, serliga um Ísland og Noregi sum limir í EFTA fylgja hinum EFTA-londunum her.

Nú fyrst í juni mánaða stendur at bresta ella bera. Á fiskivinniøkinum hevur EF sett krav um fiskiveiðikvotur upp á tilsamans 30.000 tons afturfyri tollfrælsi fyri fiskavørum á tess marknaði. Ikki bara Ísland, men eisini Noreg hevur víst hesum kravi aftur. Men eisini á øðrum økjum restar í at fáa semju, eitt nú um landbúnaðin og um ein EFTA-menningargrunn líkum økisgrunninum hjá EF.

Í vár eru alt fleiri EFTA-lond farin at umhugsa at biðja um at sleppa uppí EF, og Svøríki og Eysturríki hava tikið avgerð um at biðja um limaskap.

Við fiskivinnupolitikkinum hjá EF, har avgerðarrætturin liggur í Brússel, kemur tað tó ikki til hugs hjá Íslandi at søkja um limaskap.

## D. ÚTGREININGAR FRÁ VIRKJUM, STOVNUM OG FELØGUM

EF-arbeiðsbólkurin hevur sum nevnt vent sær til stívliga 150 virki, feløg og stovnar, herundir eisini almennar, og biðið um teirra skrivligu metingar - helst við tølum - um hvørjar ávirkanir tey halda, at ymisk tilknýti til EF, herundir verandi, kunnu fara at hava á teirra virkisøki.

Misjavnt er hvaðan svar eru komin, men EF-arbeiðsbólkurin er greiður yvir, at tað ber illa til at rokna við serligum skrivligum útgreiningum - lýst við tølum - frá mongu smáu virkjunum, ið bólkurin eisini hevur vent sær til.

Bólkurin heldur tó, at eisini smáu virkini, sjálvt um tey ikki hava sæð seg føran fyri at svara, júst við at vera spurd, eru byrjað at umhugsa sína støðu og møguleikar í framtíðini og eru vorðin meira opin fyri m.a. teimum kunningum, ið EF-arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, og øðrum upplýsingum, ið koma fram.

Tað hevur tó kenst eitt sindur hugstoytt, at fleiri týdningarmiklir almennir stovnar ikki hava svarað, og serliga slíkir stovnar, har vitan er um, at broytingar verða á teirra virkisøki við ymsum tilknýti til EF.

Svarini, ið eru komin inn higartil bæði tey, ið svara skrivi landsstýrisins frá 30.04.90 og skrivi frá arbeiðsbólkinum frá 07.11.90, eru í 2. parti; eisini tey, ið kanska ikki greitt svara settu spurningunum, tí EF-arbeiðsbólkurin heldur, at tey kortini eru við til at lýsa støðuna. Tá tað snýr seg um serligar metingar, hevur EF-arbeiðsbólkurin valt at taka fram her tey svar, ið eru komin inn frá hesum stovnum, virkjum og feløgum og í stuttum endurgeva teirra sjónarmið:

Føroya Fiskasøla
Føroya Reiðarafelag
Havbúnaðarfelagið
Føroya Ídnaðarfelag
Føroya Prentsmiðjueigarafelag
Havsbrún
Føroya Jarðarráð
Føroya Bjór
Miklagarður/SMS
Poul Hansen/Krás
Fróðskaparsetur Føroya
Landsskúlafyrisitingin
Heilsufrøðiliga Starvsstovan

**1. Føroya Fiskasøla**

Føroya Fiskasøla hevur ikki sjálv svarað spurningunum, ið EF-arbeiðsbólkurin setti í skrivinum frá 7. november 1990, men hevur valt at latið lýst, hvussu tess útflutningur hevði verið eftir fimm árum, um eingin tollur og eingin forðing var fyri føroyskum útflutningi til EF. Hvørjar vørur vildi Føroya Fiskasøla lagt seg eftir at framleitt og selt og hvussu høvdu hesar vørur ment seg. Hesa lýsing hava Rói Egholm og Súsan Klein á Fiskasøluni gjørt í neyvum samstarvi við Óla Samró frá Føroya Banka.
Neyðugt er at gera lýsingina undir ávísum fortreytum, og hesar eru:

* Rávørugrundarlagið er tað sama øll fimm árini (av botnfiskasløgunum er t.d. roknað við: toskur: 20.000 t., hýsa: 13.000 t., upsi: 45.000 t., brosma: 5.000 t., longa: 2.000 t., blálonga: 2.800 t., kongafiskur: 12.000 t., øll árini. Fyri alilaks verður tó roknað við einum vøkstri upp til 15.000 t.)

* Tollurin er 0, t.v.s. at vit hava eina fría kapping

* Føroysku virkini eru kappingarfør við virki innan EF, effektivitetur og lønarkost naður sæð undir einum

* Roknað er við føstum 1990-prísum - í hesum liggur eisini, at EF framvegis verður eitt háprísøki sæð í mun til USA og Japan

Út frá hesum rættiliga stóra útrokningararbeiði er so lýst, 1) hvussu søluvirðið hjá Føroya Fiskasølu fyri tær vørur, ið verða ávirkaðar av fríhandilsavtaluni, verður økt úr 1,22 mia. í 1990 við góðum 400 mió. kr. upp í 1,65 mia. kr. eftir 5 árum í føstum prísum, 2) hvussu stórur tollur hevði verið goldin til EF av hesari idealframleiðslu, um 1974-tollskipanin eisini galdandi fyri Bretland og Danmark framvegis var, og 3) hvussu stórur tollur EF-uppskotið frá november 1990 hevði borið við sær av hesari idealframleiðslu.

Útrokningin vísir, at við idealframleiðsluni vilja Føroyar gjalda 40 mió. kr. minni í tolli eftir EF-uppskotinum, enn um hon var gjøgnumførd eftir 1974-skipanini, og henda eisini var galdandi fyri Stóra Bretland og Danmark. Sostatt kann tað á pappírinum tykjast sum um Føroyar skuldu tikið av seinasta uppskotinum frá EF.

Hetta er tíverri ikki so. Uppskot til tollskipan frá november 1990 ber í sær, at tann gongd, ið kundi borið fram til idealframleiðsluna, verður forðað av tollinum, kvotunum og loftunum á ísaðum fløkum, raspaðum vørum, royktum vørum og partvíst øðrum góðskaðum vørum, eitt nú niðursjóðaðum laksi. Sagt verður, at ein hin størsta forðingin fyri at náa idealframleiðsluni er, um tað verður so attraktivt at selja heilan feskan fisk út av landinum, so at tað ikki fer at bera til at fáa fatur á rávøruni til hesar virðisøktu vørur.

Føroya Fiskasøla setir tí fram hesi ynski til broytingar av uppskotnu skipanini:

* Loftið á ísaðum fløkum má í minsta lagi verða 5.000 t.

* Kvotain á raspaðum vørum má í minsta lagi verða 4.550 t.

* Loftið á royktum vørum má í minsta lagi verða 1.200 t.

* Kvotain á niðursjóðaðum vørum má í minsta lagi verða 400 t.

EF-arbeiðsbólkurin hevur hug at vísa á, at tó at ein vøkstur í søluvirðinum upp á góðar 440 mió. kr. eftir fimm árum má haldast at vera lítil, so er hann í føstum prísum og vísir eina statiska mynd. Gongst eftir ætlan at fáa til vega hesa idealframleiðslu, so fæst við henni ein dynamikkur og nýggj tillaging til marknaðarkrøv, ið gevur heilt aðra og meiri virðismikla framleiðslu við munandi hægri søluvirði.

Tó at Føroya Fiskasøla sostatt ikki svarar gjølla settu spurningunum, so lýsa útrokningarnar, at verandi uppskot frá EF ikki kann góðkennast. Verður uppskotið bøtt við teimum broytingum, ið Fiskasølan ynskir, skilir arbeiðsbólkurin, at Fiskasølan er nøgd við fríhandilsavtaluna, tó at týðandi spurningar framvegis vera eftir, ið eingin loysn sæst á, nevniliga útflutningur av pilkaðum rækjum úr rávøru úr Russlandi ella Kanada og útflutningur av frystum fløkum v.m. úr tiðnaðari rávøru úr Kanada ella Russlandi.

**2. Føroya Reiðarafelag**

Føroya Reiðarafelag svarar gjølla settu spurningunum, har fyritreytirnar fyrst verða lýstar út frá

- Fiskivinnuavtaluni millum Føroyar og EF,

- Fiskivinnupolitikkinum hjá EF,

- Núverandi støðuni hjá tí føroysku fiskivinnuni serliga mótvegis EF og

- Verandi handilsskipan millum Føroyar og EF.

Í viðfestum talvum, skjøl 1, 2, 3 og 4, verður víst, (í skjali 1) hvussu føroyskur útflutningur til EF av fiski (og havbúnaði) í 1989 lutaðist á fiskasløg og framleiðslu. Somuleiðis er útroknað, hvussu stórur tollur varð goldin til EF av hesum útflutningi við verandi tollskipan. Á sama skjali 1 eru kvoturnar hjá føroyingum í ymsu høvunum víst, herundir eisini tey "TAC", ið eru tilmælt við Føroyar av toski, hýsu og upsa.

Samlaða tollgjaldið til EF av hesari framleiðslu er við núverandi skipan roknað til 48,5 mió. kr. Verður tað uppskot til fríhandilsavtalu fyri fiskavørur, ið nú fyriliggur frá EF, lagt til grund, sæst skjótt, at meginparturin av útroknaða tollinum fyri føroyskt veiddar fiskavørur til EF fer at falla burtur, og Reiðarafelagið vísir tískil á, at vit kundu spart einar 40-50 mió. kr., svarandi til at ráfiskaprísurin kundi hækka við einum 40-50 oyrum fyri kiloið.

Samstundis vísir Reiðarafelagið á, at um vit við slíkari fríhandilsavtalu vildu skert studningin til fiskivinnuna sum er einar 400 mió. kr. í dag, og tá flotin kortini hevur einar 100-200 mió. kr. í halli, so muna einar 40-50 mió. kr. í tollækking lítið.

Við at samanbera skjal 1 og 4 vísir Reiðarafelagið herumframt á ta sera truplu støðu fyri arbeiði á flakavirkjunum, um veiðan undir Føroyum eftir uppskotinum til fríhandilsavtalu frá EF varð landað rund, fesk beinleiðis í EF. Framleiðslan úr veiðuni undir Føroyum í 1989 gav samlaða inntøku upp á góðar 970 mió. kr., ið vit skuldu svara góðar 30 mió. kr. í tolli av (skjal 1). Varð henda sama veiða landað rund, fesk í EF-havnum, so varð søluvirðið knøpp 980 mió. kr., og tollurin eftir galdandi skipan upp á 120 mió. kr., vildi fallið heilt burtur eftir fyriliggjandi uppskoti.

Fyri reiðararnar vildi sostatt ein sera stórur fyrimunur ligið í uppskotinum til fríhandilsavtalu, tí skipini vildu einsamøll fingið meira burtur úr veiðuni, enn veiðan eftir - í fleiri førum - stórari viðgerð á landi í Føroyum í dag gevur.

Sama roknistykki er ikki gjørt út frá teirri fyritreyt, at veiðan undir Føroyum varð seld sum fesk fløk til EF, men Reiðarafelagið heldur kortini, at fríhandilsavtalan eigur at broytast so, at fesk fløk eisini gerast tollfrí í EF. Hetta gav manningunum betri møguleikar at vera heima oftari og gav møguleikar fyri sølu í Føroyum, tá marknaðurin í EF var lakur. EF-arbeiðsbólkurin hevur hug at skoyta upp í, at hetta eisini hevði givið meiri javnbjóðis kapping millum føroysk flakavirki og EF-virki, sbr. eisini tað, ið Føroya Fiskasøla vísir á.

Føroya Reiðarafelag viðger gjølla møguleikan fyri føroyskum limaskapi í EF, og hvørja ávirkan slíkur fer at hava fyri teirra limir. Niðurstøðan her er, at óvissan um okkara rættindi og møguleikar er so stór í dag, at hesin møguleiki er ikki ráðiligur at taka við.

Undir teirri fyritreyt, at ein tollsamgonga við EF eisini vil umfata fiskavørur fult og heilt, metir Føroya Reiðarafelag, at hesin møguleiki er frægastur at taka við, fáa vit ikki eina fríhandilsavtalu, sum vit hava ynskt hana, t.e. frítt at fara við føroyskum fiski sum fesk fløk og sum góðskaðar vørur inn í EF. Harumframt kann tollsamgongan loysa trupulleikan við upprunareglum, tí rundur, frystur fiskur og rækjur frá triðjalondum koma undir somu upprunareglur sum í EF.

EF-arbeiðsbólkurin heldur tað kortini vera rætt at vísa á, at í EF-EFTA samráðingunum fevna tollsamgongumøguleikarnir higartil ikki um landbúnaðar- og fiskavørur. Tað er tí neyðugt at kanna sera gjølla, um tollsamgongumøguleikin gevur hesar møguleikar, og annars at fylgja ráðunum frá Reiðarafelagnum um at hava neyvt samband við EFTA-londini, Noreg og serliga Ísland um felags áhugamálið, fiskivinnuna, í teimum samráðingum, ið fara fram millum EF og EFTA.

Somuleiðis eigur av álvara at verða kannað um ikki Føroyar kundi fingið eina fyri okkum líkinda avtalu við EF í samband við at Kanariaoyggjarnar, Asorurnar og Madeira eisini liggja fyri at fáa broytt avtalur teirra við EF. Í uppleggi sínum til eina nýggja avtalu leggur EF-nevndin nevniliga dent á, at teirra støða sum fjarskotnar oyggjar geva teimum rætt til serviðgerð.

**3. Føroya Havbúnaðarfelag**

Føroya Havbúnaðarfelag hevur heldur ikki sjálvt svarað spurningunum, ið settir vórðu í skrivi, dagfest 7. november 1990, men hevur latið Gloriu Kalsø sera gjølla greitt frá framtíðarútlitunum hjá havbúnaðinum og fyrimunum og vansum í samband við EF. Hon hevur tó ikki tikið støðu til spurningarnar.

Verandi tollur (2%) á feskum og frystum laksi og laksafløkum skapar ikki stórvegis trupulleikar fyri føroyskum útflutningi til EF, og tí fer tollfrí kvota sbrt. fyriliggjandi uppskot til fríhandilsavtalu fyri parti av hesari framleiðslu ikki at geva teir ovurhonds stóru fyrimunirnar. Hvørjar avleiðingar skjótt vaksandi EF-framleiðslan av aldum laksi, EF-stuðlaður, fær á framtíðar møguleikarnar fyri føroyskt aldum laksi, er ringt at meta um, men gerst Noreg limur í EF, verður EF ført fyri at nøkta egnan eftirspurning.

Við prísleguni á laksi í dag átti tó at verið gjørligt at framleitt meiri viðgjørdar vørur í Føroyum úr aldum laksi. Her hevur tollurin í EF á t.d. royktum laksi verið ein forðing, og eftir fyriliggjandi uppskoti frá EF, fer tað framvegis at verða ein stór forðing. Í fyrstu syftu nýtist hetta ikki at nerva føroysku alararnar so nógv, men fyri samfelagsbúskapin sum heild hevði tað verið ein stórur fyrimunur, um núverandi sekunda laksur (eftir komandi flokkingar-skipan, framleiðslulaksur) varð virkaður í Føroyum eitt nú til royktar ella borðklárar vørur. Av tí at størstu vakstrarmøguleikarnir fyri aldum laksi liggja í smákeypmarknaðinum hevði føroysk framleiðsla úr aldum laksi sum frá líður eisini havt týdning fyri føroysku alararnar, ið sum er flyta 86% av sínari framleiðslu til EF.

Gloria Kalsø ger í sínari útgreining ikki nógv burtur úr ælabogasílunum. Vísir bert á, at við verandi 12% tollur fyri fesk og fryst og 14% fyri roykt ælabogasíl leggur sum er stóra forðing fyri framleiðslu til EF. Eftir fyriliggjandi uppskoti fáast 600 t. í tollfríari kvotu, svarandi til framleiðsluna hjá 2 alibrúkum.

Við EF-limaskapi fella frammanfyri nevndu vansar fyri alivinnuna burtur, nýggir møguleikar stinga seg upp, men eisini aðrir trupulleikar. Higartil hava vit av innfluttum fóðri mest flutt inn úr Noregi og Íslandi. Verða hesi lond uttanfyri, verður helst ikki so lætt at fáa hetta fóðri fram um fóður úr EF-londum.

Men møguliga fæst gagn av EF-stuðlaðari gransking innan alivinnu, og sjálvt um serligar fortreytir skulu vera uppfyltar, eisini gagn av studningi úr strukturgrunnum og lán úr europeiska íleggingarbankanum. Fríur kapitalflutningur millum limalondini kann møguliga bera við sær nýggjar møguleikar at útvega pening til íløgur og rakstur, og valla ber til at hugsa sær aling á víðum havi kring Føroyar uttan peningasterkar fyritøkur koma upp í. Hetta skapar so aftur trupulleikan, um vit eru sinnaði í Føroyum at geva útlendskum kapitali og fyritøkum frítt rásarúm at troyta føroyskan heimasjógv. Limaskapur gevur jú øðrum EF-borgarum og EF-feløgum frían niðursetturætt og vinnurætt.

Í hesum sambandi vil EF-bólkurin gera vart við, at sum er, er so at siga fríur kapitalflut-ningur til og úr Føroyum, eins og tað er frítt hjá útlendingum at gera íløgur í Føroyaum.

Við EF-limaskapi fellur verandi einkarrættur til trygging burtur, og Gloria Kalsø vísir tí á, at kapping á tryggingarøkinum kann gera tryggingarnar av alibrúkum bíligari og betri.

Serligir trupulleikar - og fyrimunir - liggja í limaskapi í fríum flutningi av livandi fiski og eygarognum. Fyrimunirnir kunnu vera bíligari smolt, men somu heilsukrøv í øllum EF-londum kunnu føra við sær, at vit ikki kunnu forða fyri innflutningi av sjúkum, ið eru vanligar og kendar aðrastaðir, men eru vandamiklar í okkara umhvørvi.

At enda ger Havbúnaðarfelagið vart við, at framhaldandi menning í aling liggur í øðrum fiskasløgum enn laksi. Tað hevur tí týdning í fríhandilsavtaluni, ið sjálvsagt verður gjørd fyri longri tíðarskeið, at tryggja, at onnur ald fiskasløg ikki verða útihýst úr EF av høgum tolli.

**4. Føroya Ídnaðarfelag**

Føroya Ídnaðarfelag viðger gjølla spurningarnar frá EF-arbeiðsbólkinum, men vísir fyrst á ta kanning, ið felagið saman við Føroya Handverksmeistarafelag og menningarstovuni lat Gunnar í Liða úr Føroya Banka og Jákup Christiansen úr Sjóvinnubankanum gera, beinanvegin tað frættist, at EF vildi hava broytta skipan við Føroyar.

Kanningin vísti at ávísar framleiðslur, helst slíkar, ið framleiddu til útflutnings og til útflutningsvinnuvirksemi, ikki fóru at verða verri fyri, um Føroyar fingu fríhandilsavtalu fyri ídnaðarvørur við EF. Aðrar framleiðslur, helst slíkar, ið partvíst vóru vardar av flutningskostnaðinum, fjarleikanum frá stóra marknaðinum og av smáframleiðslu við serligum krøvum, og sum framleiddu til føroyska heimamarknaðin undir ávísari tollverju, fóru at klára seg í kappingini, hóast hetta kanska kravdi størri dugnaskap, betri leiðslu og strukturrationaliseringar innan vinnuna og á virkjunum.

Kortini var niðurstøðan av kanningini, at heilt stórur partur av føroyskum ídnaði fór at koma í álvarsligar trupulleikar, um verjan av honum fall burtur.

At verja sum frá líður ikki bøtir um kappingarføri hjá virkjum er í sjálvum sær ein trupulleiki, men Føroya Ídnaðarfelag vísir á m.a. hesar orsakir til at føroyskur ídnaður ikki er kappingarførur

1) Høgt kostnaðarstøði
2) Trupult at útvega arbeisðmegi
3) Ikki nóg góð leiðsla
4) Okkara kappingarneytar verða stuðlaðir
5) Lítil heimamarknaður.

Fyrimunirnir við komandi skipanum fara kortini bert at vísa seg sum frá líður, og bert um tiltøk beinanvegin verða framd til at minka um høga kostnaðarstøðið, betra um leiðsluførleikan á virkjunum og tryggja at føroysk ídnaðarvirki ikki fáa verri sømdir enn útlendsku kappingarneytarnir, herundir at komandi avgjaldsskipan (møguliga momsur) ber so fáar ampar við sær fyri virkini sum til ber.

At verandi skipan fellur burtur, førir við sær, at nógv arbeiðspláss hvørva, og ger tað bráðneyðugt at bøta um frammanfyrinevndu viðurskifti, so tey virki, ið hava møguleika at klára seg, ikki verða forðað í menningini og harvið í at skapa nýggj arbeiðspláss. Um ein tollsamgonga eisini kann fevna um fiskavørur, so kunnu somu upprunareglur sum í EF-londum geva arbeiðspláss og tryggari ídnaðarframleiðslu innan fiskiídnaðin úr innfluttum fiski.

Støðan hjá Føroya Ídnaðarfelagi um at neyðugt er at laga seg til framtíðar viðurskifti vísir seg eisini í viðmerkingunum um møguligan limaskap í EF. Víst verður á, at uttan mun til ein slíkan limaskap verður neyðugt at laga okkara lóggávu í mestan mun til lóggávuna í EF, eitt nú partafelagslóggávu, tryggingarlóggávu, bankalóggávu og ymiskar reglur fyri vørur og viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum.

**5. Føroya Prentsmiðjueigarafelag**

Føroya Prentsmiðjueigarafelag viðger settu spurningarnar og ger vart við, at tá tað snýr seg um føroyska blaðútgávu og føroyska bókaútgávu, so verður eingin broyting í kappingarførinum hjá føroyskum prentsmiðjum, hvørja loysn vit enn fáa. Tó vil ein momsur gera føroysk bløð og føroyskar bøkur dýrari, men samstundis falla innflutningsgjøldini á maskinur og tól burtur.

Verri er við prentlutum, tí føroyskar prentsmiðjur eru vardar í mun til útlendska framleiðslu av prentlutum, eini 20%. Sum frá líður mugu føroyskar prentsmiðjur tí økja um kappingarføri sítt á hesum øki 20%, skulu tær gera seg galdandi í hesi framleiðslu.

Við tollsamgongu kann trupulleiki vísa seg í dýrari pappíri, tí sum er fæst bíligari pappír úr Svøriki, og verður Svøríki ikki partur av slíkari tollsamgongu ella limur í EF, merkir hetta 9% dýrari pappír. Felagið metir at hesin sami trupulleiki eisini verður fyri pakkitilfar til fiskiídnaðin.

Við EF-limaskapi verður frítt at fara hjá arbeiðsmegini. Hetta kann verða ein fyrimunur fyri føroysku prentsmiðjurnar, tí higartil hevur verið leitað til Danmarkar eftir t.d. frítíðaravloysarum. Hugsandi er, at stórur fyrimunur kann vera at fáa fólk úr t.d. Skotlandi í staðin.

**6. Havsbrún**

Havsbrún vísir á, hvussu teirra støða er í løtuni mótvegis EF viðvíkjandi fiskafóðri, fiskamjøli og lýsi.

Viðvíkjandi fiskafóðri til innlendis brúk, so uppvigar eksportrestitutiónin fyri korninnihaldið í fóðrinum á tí føroyska og útlendska fóðrinum hvørja aðra (ávikavist 4 og 3 oyru/kg). Hinvegin so er føroyskt framleitt fóður verri fyri á EF-marknaðinum enn fóður framleitt innan EF orsakað av verandi tolli uppá 25 oyru/kg.

Sum er ber fiskamjøl og lýsi ongan toll, men víst verður á, at í samband við GATT-tingingarnar er innanhýsis semja í EF um at krevja toll fyri lýsi og fiskamjøl (12%) og at

áseta innflutningskvotur.

Havsbrún metir, at meinbogarnir av verandi og komandi atgerðum hjá EF tykjast at benda á fyrimunir fyri teir at Føroyar gerast limir í EF.

Eisini vísir Havsbrún á aðrar meinbogar fyri teirra kappingarføri orsakaðar av atgerðum her á landi:

a) Høgir el-prísir (eykakostn. 3,5 oyru/kg fisk)
b) Toll-skipan á íløgum (eykakostn. 4 oyru/kg fisk)
c) Orkugjald (eykakostn. 2,5 oyru/kg fisk)

Verða hesir sjálvgjørdu meinbogar tiknir burtur við eini fríhandils/tollsamgonguavtalu, tí tá verður okkara tollskipan løgd um til eina moms/orku skipan av sama skapi sum EF, so hevði hetta verið eitt stórt framstig hjá Havsbrúm.

EF-arbeiðsbólkurin hevur ta viðmerking, at Havsbrún kanska er besta dømi um, hvussu okkara toll og avgjaldsskipan er við til at avlaga okkara kappingarføri, og fáa vit ikki annað burtur úr okkara samráðingum við EF, so fáa vit vónandi umlagt okkara avgjaldsskipanir, so tær ikki stilla okkara virki verri fyri í kappingini við útlendsk virki.

**7. Føroya Jarðarráð**

Føroya Jarðarráð greiðir í sínum svari stutt og greitt frá, at fyrimunirnir við verandi skipan eru serliga, at vit kunnu ella taka okkum rætt til at gera ymiskar stuðulsskipanir heima hjá okkum við tí fyri eyga at halda brúkaraprísunum niðri, t.d. mjólkarprísinum, ella fyri at viga upp í móti niðurgreiðslustuðlinum, ið fleiri lond veita til útflutnings av yvirskotsframleiðslu, eitt nú svína- og neytakjøt og egg.

Vit hava sostatt í høvuðsheitum møguleikan at reka egnan búnaðarpolitikk.

Við nærri tilknýti til EF, kunnu vit koma at missa meira og minni av hesum møguleika, og allan møguleika við limaskapi. Við verandi landbúnaðarskipan í EF, hevði hetta merkt munandi hægri matvøruprísir í Føroyum, eisini á landbúnaðarvørum. Men tað eru aðrir vansar við EF-limaskapi enn bert teir handilspolitisku.

Tað verður ikki hildið heppið, um EF-borgarar fáa rætt og møguleika at keypa jørð í Føroyum. Hetta fer at nøra um uttanbíggjajørðina (uttanlandsjørðina), og fer helst at hækka um jarðarprísirnar, ið longu eru avlagaðir, so enn truplari verður hjá fólki, ið hevur jarðarbrúk sum vinnu, at keypa jørð.

Til hetta viðmerkir arbeiðsbólkurin, at vit í dag ongar avmarkingar hava fyri keypi útlendinga av jørð og ognum í Føroyum. Arbeiðsbólkurin skilir tí viðmerkingina frá Jarðarráðnum soleiðis, at slíkar avmarkingar áttu at verið framdar nú, áðrenn tað er ov seint.

Føroya Jarðarráð leggur dent á, at vit við limaskapi ikki longur kunnu halda fast við tær stuðulsskipanir, sum vit hava mett serliga ákravdar her til tess at stimbra vinnuna, stuðla

bygdamenningini, tryggja inntøku bónda o.s.fr. Við fríhandilsavtalu ella tollsamgongu mugu vit umhugsa verju av hesum stuðulsskipanum.. Við limaskapi koma vit inn undir landbúnaðarpolitikkin og -skipanirnar hjá EF, men hvørt hetta gevur føroyskum bóndum eins góðar møguleikar sum í dag, verður ikki umrøtt. Vit kunnu ikki rokna við at fáa lut í serligu stuðulsskipanunum, ið EF annars hevur til landbúnaðin, so høgt inntøkustøðið kortini er í føroyska landbúnaðinum og samfelagnum sum heild.

Føroya Jarðarráð ger kanska meiri enn onnur, ið hava svarað, burturúr teimum lógartillagingum, ið so stórliga vanta her hjá okkum. Víst verður m.a. á tørvin á einari jarðarlóg og á lóg um landsætlan. Hesar lógir eiga at koma í góðari tíð, áðrenn nærri samband verður fingið við EF, og neyðugt er at tryggja at hesar lógir verða evnaðar til so tær ikki uttan víðari kunnu kveistrast til viks, um nærri tilknýti til EF verður valt.

**8. Føroya Bjór**

Føroya Bjór ger vart við, at við verandi tilknýti til EF fær bryggjaríið bíliga rávøru við niðurgreiðsluskipanini hjá EF. Fella hesar skipanir burtur sum liður í fríhandilsavtalu ella tollsamgongu við EF, dýrkar malt og sukur hjá virkinum umleið 800.000 kr.

Føroya Bjór leggur annars dent á, at kemur meirvirðisgjald, má landsstýrið ansa eftir, at framleiðslugjaldið verður tað sama á føroyskum vørum og á EF-vørum. Í løtuni er henda skipan tilvildarlig.

Føroya Bjór leggur annars stóran dent á, at verandi lóg um forboð ímóti eingangsamballagu ikki fer úr gildi. Eins og í Danmark kunnu vit vísa til umhvørvisorsakir.

At enda ræður Føroya Bjór landsstýrinum til at halda fast við at tað er landsstýrið, ið eisini frameftir skal geva bryggiloyvi. Hetta kann gerast við at vísa til okkara serligu útjaðaraviðurskifti.

**9. Miklagarður/SMS**

Umframt greitt at svara spurningunum setir Miklagarður/SMS upp fyrimunirnar við verandi skipan, tá tað snýr seg um niðurgreiðsluskipanina fyri landbúnaðarvørur, ið verða seldar í smáhandilsliðinum og bakaríunum.

Metingin, ið er gjørd við støði í egnari sølu og vitan um samlaðu søluna, vísir, at føroyingar yvirhøvur spara um 32 mió. kr. um árið orsakað av niðurgreiðsluskipanini. (Verður sparingin í innflutningsgjaldinum tikin við, liggur sparingin um 43 mió. kr.)

**10. P/f Poul Hansen/ P/f Krás**

Eins og Miklagarður/SMS ger P/f Poul Hansen/P/f Krás vart við fyrimunirnar við verandi møguleika í bíligari landbúnaðarvørum úr EF. Harumframt hevur P/f Krás gjørt stórar íløgur

og bygt upp framleiðslu við støði í tollverjuni í verandi skipan. Fellur henda verja burtur, so er framleiðslan einans møgulig við serføroyskum vørum og møguliga við íslendskari rávøru.

Felagið biður annars um møguleikar fyri tollfríari goymslu í Føroyum til transithandil og til at gera útlendsk skip út.

Felagið ger annars vart við, at fyri heilsølufyritøku hevur tað stóran týdning, at fyrsta gjaldið í einari møguligari meirvirðisgjaldsskipan verður lagt beinanvegin vøran kemur til landið (sum nú). Verður hetta ikki gjørt, so kann hvør einasti innflytari, heilsøla ella kiosk liggja við stórari tollfríari goymslu.

## 11. Fróðskaparsetur Føroya

Fróðskaparsetur Føroya hevur ikki svarað spurningunum frá EF-arbeiðsbólkinum, men hevur áðrenn bólkurin varð settur svarað tí skrivi, ið Føroya landsstýri eftir tilmæli frá menningarstovuni sendi út 30. apríl 1990. Hetta skriv setti ikki so nágreiniligar spurningar, sum skrivið frá arbeiðsbólkinum, ið ikki er so bundin.

Fróðskaparsetrið vísir í sínum skrivi á, at við fríhandilsavtalu, ið tá var spurt um, vóru eingir vansar, einans fyrimunir, vórðu møguleikarnir nýttir. Fyri ein vísinda-, granskingar- og undirvísingarstovn sum Fróðskaparsetur Føroya er, tykist verandi skipan at byrgja okkum inni, alt meðan altjóðasamfelagið mennist og størri og størri samstarv tekur seg upp innan vísind, gransking og útbúgving í Europa, serliga innanfyri EF, men eisini millum EF og EFTA.

Vit eru við í Norðurlandasamstarvi, men kunnu ikki nýta NORDPLUS-skipanina til fulnar, og vit áttu at lagt stóra orku í við fríhandilsavtalu at fingið avtalu, ið gevur okkum atgongd til ERASMUS-skipanina.

Samstarvið og menningin innan EF á júst hesum økjum fer nú fram í risastórum lopum, og tí áttu vit eisini at kanna møguleikarnar at fingið lut í øðrum samstarvsskipanum, sum t.d. LINGUA, COMETT, ESPRIT II, EUREKA, SCIENCE o.s.fr.

## 12. Landsskúlafyrisitingin

Eins og Fróðskaparsetur Føroya hevur Landsskúlafyrisitingin ikki svarað spurningunum frá EF-arbeiðsbólkinum, men svarað skrivinum frá landsstýrinum frá 30. apríl 1990. Landsskúlafyrisitingin ger vart við nakað tey somu sjónarmið sum Fróðskaparsetrið.

Landsskúlafyrisitingin ger vart við, at undirvísingarliga støðið her heima eigur at verða skipað soleiðis, at tað gevur yrkisførleika til tess at virka og víðari lestrarmøguleika eisini úti í heimi. Sjálvsagt eigur øll útbúgving fyrst og fremst at hava til endamáls at nøkta tørvin í egnum landi á útbúnum fólki og harumframt at nøkta krøvini til yrkisførleika á ávísum økjum, men samfelagið hevur eisini skyldu at laga útbúgvingarnar soleiðis, at girðingin um "heimabeiti" ikki gerst ein forðing fyri at viðkomandi, ið er undir útbúgving, seinni kann leita sær yrki ella framhaldslestur í øðrum londum.

Øll norðurlond eru í dag - saman við øðrum londum í Europa - gingin saman um eitt samstarv, sum hevur til endamáls at kunna hvørt annað um útbúgvingarnar hjá hvørjum øðrum (CEDEFOP, EUROTECNET, PETRA, TENET, COMETT, ARION og NORDPLUS eru dømi um slíkt samstarv). Hetta verður m.a. gjørt fyri at tryggja millumlanda yrkisførleika og lestrarmøguleika.

Vit eru ikki við í nevndu samstarvum, og EF-arbeiðsbólkurin fær ta fatan, at politisku myndugleikarnir hava ikki strongt á at tryggja slíkar samstarvsmøguleikar undir verandi skipan, heldur ikki fyri Fróðskaparfelag Føroya. Men teir so kunnu verða fingnir í lag í samband við eina fríhandilsavtalu.

Á fundi við EF-arbeiðsbólkin hevur umboð fyri Landsskúlafyrisitingina gjørt vart við, at nú føroysk undirvísing ikki longur fylgir tí donsku, fylgir hon ikki longur við í menningini av undirvísing sum heild og verður tí meira og meira afturútsigld.

EF-arbeiðsbólkurin heldur hetta vera sera álvarsligt, og limir í bólkinum vilja ganga so langt sum at siga, at verður hetta ikki broytt í bræði, mugu teir viðmæla bæði vegna vinnulívið og fyri teirra ungu skyld, at farið verður uttanlands at nema sær allar víðari útbúgvingar.

**13. Heilsufrøðiliga Starvsstovan**

Heilsufrøðiliga Starvsstovan ger í sínum svari vart við, at uttan mun til hvat tilknýti vit hava og fara at fáa við EF, so slepst ikki undan at føroysk virki og fiskifør skulu lúka somu treytir til løggilding sum fara at verða galdandi í EF. EF-arbeiðsbólkurin kann skoyta uppí, at hetta er sjálvsagdur lutur, tí 70% av okkara útflutningi fer til EF og vit verða noydd at laga okkum eftir teimum krøvum, ið marknaðurin setir.

Sum er kann landsstýrið við heimild í matvørulógini lata Heilsufrøðiligu Starvsstovuna áseta tær reglur fyri matvøruframleiðslu, ið til eina og hvørja tíð eru hóskiligar og neyðugar. Hetta er júst gjørt við nýggju reglunum fyri løggilding av virkjum, og Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur í hesum reglum lagað tær eftir teimum løggildingarreglum, sum eru skotnar upp av EF-kommissiónini at galda fyri innara marknaðin (KOM (89) 645).

Í hesum reglum sum EF-nevndin hevur skotið upp, hevur EF-nevndin eisini tikið við, hvussu tvídráttir millum lond um heilsufrøðilig mál skulu loysast, sbr. sandmaðkagøluna. Fáast hesar reglur at virka, verður tað ein stórur fyrimunur í mun til núverandi støðu.

At fáa nýggjar løggildingarreglur er fyrsta stig, annað og tyngri stig er at virkini skulu lúka treytirnar fyri løggilding. Her eru ávís viðurskifti hvat reinføri og reinførismøguleikum viðvíkur, ið mugu loysast á virkjunum, og tey mugu haldast nógv betri við líka. Starvsstovan ger vart við at nakað langt er á mál, og at vit mugu rokna við nakað av íløgum, skulu reglurnar, ið fara at galda í EF, lúkast.

Enn eru bert fáar ítøkiligar reglur gjørdar viðvíkjandi sjálvum fiskinum og fiskaúrdráttum. Helst verður talan um reglur, ið líkjast Codex Alimentarius, og vit mugu støðugt fylgja við og laga okkum til hesar reglur, so hvørt tær koma sum uppskot og verða settar í verk.

Umframt reglur um virkir, skip og fiskavørur, so fara vit eisini at fáa reglur um krøv til almenna eftirlitið, ið skal skjalprógva eina eftirlitsskipan, ið EF-nevndin skal góðkenna. Megna vit ikki hetta, koma vit undir beinleiðis eftirlit av serkønum frá EF-nevndini.

Stutt sagt skulu vit vænta krøv á øllum økjum, og sum triðjaland fara tey at kennast strangari enn við ávísum tilknýti til EF. Vit mugu tí brynja okkum til at lúka hesi krøv. Starvsstovan vísir tí á, at tað helst hevði verið ein stórur fyrimunur, um tað eydnaðist fiskavirkjunum at verða certificeraði eftir ISO 9000 røðini. Slíkt hevði gjørt eina og hvørja skjalpróvførslu meira virkna og haldgóða.

Av tí at summi EF-lond, eitt nú Grikkaland, ikki megna at lúka nýggju treytirnar í uppskotinum KOM (89) 645 longu í januar 1993, tá tær vóru ætlaðar at fáa gildi, koma tær kanska fyri EF sum heild møguliga ikki í gildi fyrr enn í 1996. EF-arbeiðsbólkurin heldur tó, at fyri okkara kappingarføri eiga vit at lata januar 1993 vera okkara mál. Til hetta krevst tó, at virkini eru fíggjarliga betri fyri, so tey megna at gera neyðugu íløgurnar.

## E. RÍKISRÆTTARLIGA STØÐA FØROYA

**Alternativir møguleikar**

### 1. Inngangur

Europeiski felagsskapurin EF umboðar ein stóran marknað, við stórari keypiorku. Tí vilja lond, ið eru uttanfyri, sleppa framat hesum marknað, ofta við serligum avtalum. Niðanfyri verður greitt frá ymsum samstarvsmøguleikumum hjá uttanfyristandandi londum, ið ongar serligar avtalur hava, t.e. triðjalondum.

Tá ið eitt land verður limur í EF, verður samráðingarrætturin á teimum økjum, ið fevna um EF, yvirtikin av EF. Við at vera uttanfyri EF varveitir eitt land rættin til sjálvstøðugt at samráðast við onnur lond. Tað hevur t.d. uttan iva verið ein fyrimunur fyri Føroyar sjálvstøðugt at kunna samráðast um fiskiavtalur við onnur lond.

### 2. Støðan hjá triðjalondum

Sum triðjaland hevur ein ikki serligar skipanir við EF. Tá útflutt verður til EF, skal tollur gjaldast sambært felags EF-tollsatsum. Sum oftast er talan um lutfalsliga lágan toll á rávøru og hálvlidnari vøru, men høgan toll á liðugtvøru.

### 3. Framíhjárættindi innan EF

Fleiri lond og umráði við tilknýti til limalondini í EF hava serlig framíhjárættindi, ið geva møguleika fyri at útflyta til EF við ongum tolli ella lækkaðum tolli.

Fyri Føroyar hevur EF í 1974 ásett eina skipan við niðursettum tolli, tá liðugtvørur verða útfluttar, og við tolli á útflutningi av feskum fiski.

Tollur verður ikki roknaður av útflutningi til Danmarkar og er nógv lækkaður við útflutningi til UK.

Hendan framíhjáskipanin varð ásett, tá Føroyar nýttu eina 3 ára umhugsunartíð til møguliga at gerast veruligir limir í EF saman við Danmark. Uppbygningurin av framíhjáskipanini svarar stórt sæð til føroysku ynskini, eins væl í 1974 sum í 1991.

### 4. Handilsavtalur

Tann minst umfatandi avtalan eitt land kann hava við EF, er ein handilsavtala, ið umfatar serligar treytir fyri vøruhandli annan- ella báðar vegir.

### 5. Fríhandilsavtala

Ein fríhandilsavtala verður nógv meira umfatandi, tí hon sum oftast umfatar allar

ídnaðarvørur. Undantiknar kunnu t.d. vera landbúnaðarvørur og/ella úrdráttir úr fiski. EF er ein tollfelagsskapur, við einum felags tollmúri úteftir. EFTA et eitt fríhandilsumráði. EFTA londini hava fríhandilsavtalur við EF.

Í einum fríhandilsumráði hava londini tikið innanhýsis tollmørkini av, sum oftast fyri ídnaðarvørur.

Tá londini kunnu hava ymsar ytri tollmørk, er ein fyritreyt fyri tollfrælsi, at vørurnar meira ella minni hava sín uppruna í limalondunum. Av vørum, ið koma úr øðrum londum, verður tollur kravdur.

**6. Tollsamtøka**

Í einum tollfelagsskapi, er umframt fríhandil millum londini innanfyri, eisini felags tollmúrur úteftir. Tá so er, kunnu allar vørur, eisini innfluttar vørur ferðast frítt.

**7. Associering**

Sum fyrireiking til møguligan fullan limaskap seinni, kann nærri og meira víttfevnandi avtala verða gjørd við EF, hetta verður rópt ein tilknýtisavtala (associering). Í eini slíkari avtalu verður meira tikið við enn bert vøruhandil, t.d. at arbeiðsmegi og peningur kunnu ferðast frítt.

**8. EF-EFTA: Europeiskt Búskaparligt Samstarv (EBS)**

Í fleiri ár hava samráðingar verið millum EF og EFTA um meira umfatandi avtalur, sum skuldu føra til eina fíggjarliga samanlegging millum londini í EF og EFTA á nærum øllum økjum.

Men nú hendir so tað, at fleiri av limalondunum í EFTA søkja um fullan limaskap í EF. Í øðrum EFTA londum verður støðan umhugsað av nýggjum, nú støðan í Europa er broytt. Innan fleiri umráði eru slíkar avtalur meir ella minni liðugtviðgjørdar. EFTA londini hava góðtikið EF reglurnar sum grundarlag. EFTA londini fáa møguleikan fyri at luttaka í fyrireikingunum til EF lóggávuna, og fáa møguleikar fyri í serligum førum at fáa undantaksloyvi frá EF-reglunum.

EFTA londini fáa innan summi øki serligar trygdir, soleiðis at serlig undantøk kunnu gerast seinni, um framburðurin (udvikling) verður ørvísi enn væntað. T.d. kundi Ísland ynskt at steðga streyminum av útlendskari arbeiðsmegi, um hon gjørdist rættuliga stór.

Enn er ikki liðugt at samráðast á fiskivinnuøkinum.

Út frá hesi ógreiðu samráðingarstøðuni, er tað torført nú, at úttala seg um framtíðina hjá EFTA.

## 9. Limaskapur

Fullur limaskapur í EF nýtist ikki at merkja, at allar EF reglur koma at galda við tað sama. Í sáttmálunum um limaskap verður oftani gjørd ein skiftisskipan (overgangsordning) innan ávís umráði.

Umframt at hava frían vøruhandil innanfyri felags tollmúr umfatar EF eisini at arbeiðsmegi og kapitalur kunnu flytast frítt. Eisini er frítt at stovna feløg. Tá innmarknaðurin kemur í gildi í 1993 er felagsmarknaðurin nærri enn nakrantíð.

í hesum døgum er EF í ferð við at menna samarbeiði við eini búskaparligari og peningaligari samgongu og eini politiskari samgongu.

Vit kunnu siga, at samarbeiðið gerst alt nærri, og verður hetta heslt eisini gongdin framyvir.

## 10. Frágreiðing frá danska uttanríkisráðnum

Notat af 27. marts 1991 om konsekvenser for hjemmestyret af eventuelt medlemsskab samt mulighederne for påvirkning af EF-beslutninger (víst verður til 3. part).

> Í hesum skrivi er eitt yvirlit yvir umráðir við EF reglum. Harumframt verður sagt frá hvussu avgerðir verða tiknar í EF og hvørjir møguleikar eru hjá Føroyum at ávirka hesar. "Hovedkilden til indflydelse ville i givet fald blive via den danske beslutnings-proces." (s.4).

Notat af 9. april 1991 om generelle aspekter Færøerne-EF (víst verður til 3. part).

> Skrivið sigur í høvuðsheitum frá støðu Føroya til EF, serliga frá støðuni landanna millum. Høvuðsdentur er lagdur á verandi støðu, men ávísir framtíðarmøguleikar verða eisini tikinr fram.

Notat (2. udkast) af 8. april 1991 med bilag om Færøerne-EF: Alternative tilknytningsformer (víst verður til 3. part).

> Í hesum skrivi verður nágreiniliga greitt frá alternativum samarbeiðsmøguleikum, sum frammanfyristandandi stutta frágreiðing er bygd á.
>
> Í avtalum um handil við vørum og øðrum samarbeiði verður sagt, at partarnir ikki mugu gera mun á innlendskum og útlendskum vørum, t.d. við tolli og avgjøldum, ríkisstuðli o.a.
>
> Í skrivinum verður sagt frá tilknýtisskipanum hjá fleiri londum og umráðum við tilknýti til limalondini í EF, OLT, Lomé, Tey fronsku amtini handan hav, Man og Ermasundsoyggjarnar, Kanariaoyggjarnar, Asorurnar, Madeira, Andorra, San Marino, Monaco, Gibraltar og onnur. Harumframt verður greitt frá uppskotinum hjá EF nevndini (kommisionen) um serliga ætlan fyri at stuðla Kanariaoyggjunum (POSEICAN, KOM(90) 686 endaliga útgávan) og fyri Madeira og Asorurnar

(POSEIMA). Tað framgongur av hesum, at hevur ein støðu sum fjartliggjandi oyggjar, so hevur ein rætt til positiva serviðgerð; í báðum førum er inntøkan pr. íbúgva sera lág og langt undir miðaltalinum innan EF. Skotið er upp, at Kanariaoyggjarnar eftir eina skiftitíð, sum verður úti 31. desember 2000, skal innlimast í tollsamgonguna hjá EF.

Notat af 19. maj 1989 om redegørelse for problemstillingen omkring Færøernes mulige nærmere forbindelse med EFTA set på baggrund af den seneste udvikling i EF-EFTA forholdet.

Í skrivinum er niðurstøðan henda:

"Folkeretligt vil det i givet fald være særdeles besværligt, men næppe helt umuligt at få et specielt dansk medlemsskab på Færøernes vegne i stand. Statsretligt er dette formentlig heller ikke umuligt.

En sådan løsning forenelighed med rigsfællesskabet vil have såvel retlige som politiske aspekter. Vurderingen heraf vil i sidste instans tilkomme regering og folketing, men der kan påpeges væsentlige betænkeligheder for så vidt angår foreneligheden af et sådant arrangement med Danmarks stilling som medlem af EF."

Helst verður henda støðan mett av nýggjum, um EFTA ger eina umfatandi avtalu um EBS.

Sum greitt frá omanfyri er framtíðin hjá EFTA sera óviss, tí fleiri av limalondunum fara at søkja um limaskap í EF í 90'unum.

# F. EF OG FRAMTÍÐARÚTBYGGING AV EF

## 1. Inngangur

Hendan frágreiðingin er ikki ein nágreinilig gjøgnumgongd av søguligu gongdini í EF. Niðanfyri er stutt yvirlit yvir tey umráði, ið EF samarbeiðir á í dag.

Annars verður víst til skriv, ið Føroya Landsstýri hevur givið út: EF Úrslit og Útlit, februar 1991.

Harumframt verður víst til tey kunningarskriv, sum EF-arbeiðsbólkurin hevur gjørt, og sum eru kunngjørd gjøgnum fjølmiðlarnar. Kunningarnar eru annars í 4. parti. Meira nágreiniligir upplýsingar kunnu fáast fyri einki frá Upplýsingarskrivstovuni hjá EF í Keypmannahavn (tlf. 33 14 41 40) ella kunnu keypast frá Schultz Information (tlf. 36 44 22 66).

## 2. Vørur frítt at fara

### 2.1. Tollsamgonga

Við at gera tollsamgonguna hava limalondini gjørt tað møguligt at flyta vørur frítt runt í Europa. Felags tollurin úteftir merkir, at tey einstøku limalondini kunnu ikki fáa fyrimunir tá innflutt verður frá triðjalondum.

### 2.2. Innmarknaðurin

Við at stovna innmarknaðin verður miðað ímóti eisini at taka av aðrar forðingar fyri fríum handli við vørum og tænastum. Innmarknaðurin skal vera klárur innan árslok 1992.

#### 2.2.1. Avtøka av fysiskum eftirliti við markini

Fyri at lætta enn meira um fría handilin skal eftirlitið við innanhýsismarkini takast heilt av.

#### 2.2.2. Avtøka av tøkniligum handilsforðingum

Við javnføring av tøkniligum støddum ynskir EF at mismunur ikki skal verða mótvegis øðrum EF-limalondum.

#### 2.2.3. Javnføring av momsi og gjøldum

Fyri at sleppa undan, at handil um markini verður ávirkaður av muni í momsi og gjøldum er neyðugt, at hesi verða javnførd í teimum ymsu londunum.

## 3. Arbeiðsmegi frítt at fara

Skundast skal undir at arbeiðsmegin skal hava frítt at fara.

**4. Kapitalur frítt at fara og frítt at seta virki á stovn**

Í EF er nú við at verða greitt, at til ber at flyta kapital frítt, og at frítt verður at seta feløg á stovn. Hetta skal eisini henda á tænastuøkinum, s.t.d fyri. peningastovnar og trygging.

**5. Rómarsáttmálin § 7**

Týdningarmesta greinin í Rómarsáttmálanum er § 7. Eftir henni er ikki loyvt at gera mismun grundað á tjóðskap, (sí 8. kunning).

**6. Felags landbúnaðar- og fiskivinnupolitikkur**

Á næstan øllum økjum virkar EF soleiðis, at meginreglurnar verða avtalaðar í felagsskapi, men verða settar í gildi við lóggávu í hvørjum landi sær. Á tveimum týdningarmiklum umráðum er hetta ikki loyvt. Landbúnaðar- og fiskivinnupolitikkurin verður lagdur í Brússel. Hetta hevur avgerðandi týdning fyri Føroyar, tí við limaskapi í EF ella við tilknýti, verður ikki gjørligt at varðveita einkarræði á hesum økinum. Størsti parturin av EF-fíggjarlógini verður nýttur til landbúnaðin.

**6.1. Felags landbúnaðarpolitikkur**

Høvuðsendamálið við felags landbúnaðarpolitikkinum er at halda eini nóg høgari príslegu, so inntøkurnar kunnu tryggjast, serliga á teimum minnu brúkunum. Hetta hendir á tann hátt, at falla prísirnir niður um teir ásettu minstuprísirnar, verður keypt upp. Yvirskotsgoymslurnar verða, við studningi, seldar á heimsmarknaðinum. Prísirnir á heimsmarknaðinum eru lægri enn í EF, (sí 10. kunning).

Í GATT verður, undir Uruguay-Umfarinum, tingast um eina umskiping. Serliga londini, ið framleiða korn, eru áhugaði fyri eini umlegging í EF.

EF-nevndin er komin við einum uppskoti, sum semja ikki enn er um í EF. Uppskotið miðar ímóti eini umlegging frá prísískoyti til beinleiðis stuðul til minnu brúkini, eitt ískoyti pr. ha upp til ávísa stødd á brúkum.

Ein slík umskipan fer helst at føra til lægri príslegu á landbúnaðarvørum í EF og harvið eisini fyri aðrar matvørur, m.a. fiskavørur.

**6.2. Felags fiskivinnupolitikkur**

Í Kunningarskrivunum nr. 4 og 5 er greitt frá felags fiskivinnupolitikkinum í EF. EF hevur júst givið út nýtt skriv í røðini Europa Skriv um fiskivinnupolitikkin í EF, nr. 3/91 mars 1991. fiskivinnupolitikkurin umfatar tey 4 høvuðsumráðini, ið lýst eru niðanfyri:

Fiskivinnupolitikkurin hjá EF skal takast upp til nýggja viðgerð innan árslok 1992, tí avtalað

er at viðgera hann av nýggjum 10. hvørt ár. EF-nevndin legði í desember 1990 fram eina frágreiðing um støðuna, soleiðis sum EF-nevndin metti hana. Henda frágreiðing hevur júst verið til viðgerðar í EF-ráðnum (Ráðharraráðnum) á einum fiskimálaráðharrafundi hin 18. apríl 1991. Innan árslok 1991 skal EF-nevndin leggja fram ta endaligu frágreiðingina, sum tingingarnar í 1992 verða grundaðar á.

Fiskimálaráðharrarnir vóru samdir um:

* Verandi kvotaskipan skal varðveitast

* Verandi teknisku varðveitingatiltøkini skulu betrast og byggjast út

* Verandi eftirlitisskipan skal nýtast strangari og einklari

* Fiskiorkan skal skerjast

* Hvat ið kemur á marknaðirnar skal kannast nærri út frá tí, at Felagsmarknaður fær ikki nóg mikið av fiski. Talað varð um eina størri liberalisering. Annars eigur at verða syrgt fyri at verja áhugamálini hjá EF-framleiðarunum á jøvnum kappingarstøði millum Felagsmarknaðin og triðjalond.

* Fiskivinnusamband við triðjalond er framhaldandi av alstórum týdningi, av tí at undirskot er á fiskavørum á marknaðunum innan Felagsskapin, og tað er neyðugt at varðveita og økja um atgongdina til tilfeingið hjá triðjalondum. Í hesum sambandi varð tó ásannað, at í teimum avtalum, ið EF kemur at gera í framtíðini, skal verða hugsað um sjálvsøgdu ynskini hjá triðjalondum at menna egnar møguleikar, so tey betri kunnu stýra og nýta tilfeingið; men avtalurnar í framtíðini skulu í høvuðsheitum verða verandi handilsligar avtalur, og í hvørjum einstøkum føri skal verða hugsað um serligu ynskini hjá limalondunum eins og um serligu viðurskiftini og ynskini hjá teimum, avtalan verður gjørd við. Eisini vóru ynski sett fram um at kanna rentabilitetin í hesum avtalunum.

### 6.2.1. Varðveitan av fiskastovnum

At varðveita fiskastovnarnar er eitt høvuðsmál við fiskivinnupolitikkinum. Fiskivinnupolitikkurin hjá EF má metast at hava verið skeivur á hesum umráði, tí nú verður roknað við, at orkan í fiskiskipaflotanum er uml. 40% ov stór. Støðan er ikki batnað eftir at Spania er vorðið limur, tí Spania hevur nógva meirorku.

### 6.2.2. Marknaðarskipanin

Á sama hátt sum við landbúnaðarskipanini verða ásettir vegleiðandi prísir á fiski. Falla prísirnir undir teir ásettu, keypir EF.

**6.2.3 Strukturpolitikkurin**

Við strukturpolitikkinum luttekur EF í fíggingini av íløgum við atlit at:

* Upphøggingarstuðli við tí fyri eyga at tálma orkuni
* Endurnýggjan av fiskiflotanum (byggjan av skipum)
* Umbyggjan av fiskiflotanum
* Menning av royndarfiskiskapi
* Menning av aling
* Betran av infrastrukturinum á landi o.a.

**6.2.4. Avtalur við triðjalond**

Við avtalum við triðjalond verður roynt framhaldandi at sleppa at fiska har har ein er vanur ella verður roynt at fáa EF-fiskiførum atgongd til nýggjar fiskileiðir.

**7. Felags avtalur við triðjalond**

Á teimum økjum, har EF hevur lagt ein felags politikk er samráðingarrætturin latin EF vegna limalondini. Hetta er m.a. galdandi í altjóða handilssamráðingunum í GATT.

**8. Felags økispolitikkur**

Innan fyri EF er stórur munur millum inntøkurnar og sera stórur munur í arbeiðsloysinum. Við tí í huga at minka um vandan í teimum landslutum, har ringast stendur til, nú alt verður lagt meira saman, eru upphæddirnar til menning av hesum landslutum nógv hækkaðar.

Fæið úr landspartamenningargrunninum verður fyrst og fremst nýtt til øki har inntøkurnar eru undir 75% av miðaltalinum fyri EF ella økjum við arbeiðsloysi, ið er hægri enn miðaltalið fyri EF. Harumframt hevur verið hugsað mest um landbúnaðarumráði, og umráði har ídnaðurin er í afturgongd.

**9. Stovnar undir EF**

Víst verður her til 1. og 9. kunning.

### 9.1. EF-ráðið (Ráðharraráðið)

Í EF verða avgerðir tiknar í EF-ráðnum, har øll londini eru umboðaði. Avgerðir um innmarknaðin kunnu verða tiknar við kvalifiseraðum meiriluta; øll londini hava ikki líka nógvar atkvøður. Allar aðrar avgerðir skulu vera einmæltar.

### 9.2. EF-nevndin

Í EF hevur Nevndin rætt til at taka initiativ, t.v.s. rætt at leggja uppskot fram at taka avgerð um.

### 9.3. EF-dómstólurin

Trætur viðvíkjandi EF-rættinum kunnu leggjast fyri EF-dómstólin.

### 9.4. EF-tingið

Í EF hevur tingið bert rætt at viðgera øll uppskot, t.v.s. at Tingið ikki hevur avgerðandi ávirkan á nakra avgerð.

### 9.5. EF-lóggávan

Í lóggávuni verða nýtt trý sløg av rættaratgerðum: fyriskipanir, direktiv og samtyktir.

#### 9.5.1. EF-fyriskipanir

Fyriskipaninar hava beinleiðis gildi fyri land og fólk í EF.

#### 9.5.2. EF-direktiv

Direktivini hava limalondini skyldu at seta í verk við egnum lóggávum.

#### 9.5.3. EF-samtyktir

Samtyktirnar eru bindandi fyri tey, sum tær viðvíkja.

Sí eisini 1. og 9. kunning.

## 10. Framtíðarútbygging av EF

### 10.1. Inngangur

EF er í støðugum framburði. Talið á limalondum er vaksið síðani stovnanina, og kemur at økjast komandi árini. Helst verða fleiri Norðanlond limir eins og fleiri eystureuropeisk. Nú í 1991 tingast limalondini um at víðka umráðini hjá EF, lutvíst til eitt búskaparligt og peningaligt samveldi, lutvíst til eitt politiskt samveldi.

### 10.2. Búskaparligt- og peningaligt samveldi

Víðkanin av valutasamarbeiðnum til eitt veruligt búskaparligt og peningaligt samveldi førir við sær eina felags europeiska peningaeind, ECU. Í løtuni er ikki semja um nær farast skal yvir til felags peningaeindina.

Harafturímóti er helst semja um at stovna ein europeiskan felagsbanka, EuroFed, sum skal hava ábyrgdina fyri felags europeiska peningapolitikkinum í framtíðini.

### 10.3. Politiskt samveldi

EF-londini hava í dag eitt uttanríkispolitiskt samarbeiði uttanfyri EF. Grundað á politisku gongdina, serliga ta trygdarpolitisku, eru ynski um, at EF skal føra ein felags uttanríkispolitikk.

Tó hava EF-londini havt trupulleikar við at taka felags avgerðir í altjóða høpi, s.t.d. flógvaspurninginum.

### 10.4. Nærleikameginreglan (Subsidiaritetsprincippet)

Í samband við at EF verður útbygt er ynski um at leggja stóran dent á nærleikameginregluna (subsidiaritetsprincippet). Nærleikameginreglan førir við sær, at ikki fleiri avgerðir enn hægst neyðugt verða tiknar av EF. So nógvur avgerðarrættur sum gjørligt, skal framhaldandi vera hjá limalondunum.

### 10.5. Øki við tjóðskaparligum sjálvsavgerðarrætti

Fleiri øki verða framvegis undir tjóðskaparligum sjálvsavgerðarrætti, t.d. almanna- og mentanarpolitikkur.

# G. NEYÐUGAR TILLAGINGAR Í FØROYSKUM VIÐURSKIFTUM Í SAMBANDI VIÐ YMIST TÆTTARI SAMBAND VIÐ EF

## 1. Inngangur

Tann skipan, ið vit hava havt við EF og einstakar partar av EF, er uppsøgd, og við hesi uppsøgn er eisini greitt, at teir fyrimunir, ið vinnulívið í Føroyum higartil hevur havt í Danmark, eisini fella burtur.

Fram til 1972 vóru munirnir í vinnulóggávu í Føroyum og í Danmark ikki størri, enn at teir kundu verða skemtiliga umrøddir. Teir skaptu heldur ikki stórvegis trupulleikar millum Føroyar og Danmark, tí so stutt tíð var liðin síðan broytingarnar vóru hendar í Danmark, eitt nú í partafelagslóggávuni, í avgjaldsskipanini (moms) og í skattaskipanini.

Eftir 1972 gerast munirnir meira sjónskir og týðandi. Føroyar fara úr EFTA og fáa eina skipan við EF, ið verður sera væl móttikin í Føroyum. Hesi handilsviðurskifti verða í Føroyum nýtt til at reka ein almennan vinnulívspolitikk, ið er mest átøkur merkantilismu, meðan heimurin rundan um okkum við risafetum gongur fram ímóti fríhandli og at leggja allar forðingar fyri vørum, tænastum, arbeiðsmegi og kapitali niður.

Gloppið millum føroyska og danska vinnulívslóggávu gerst alt størri, eisini tí at Danmark við menningini av EF og grundað á EF-fyriskipanir og direktiv setir lógir í gildi, ið ikki fremst hava við ríkið at gera.

Í 70 og 80-árunum fer eisini fram ein leingi ynskt føroysk yvirtøka av ymsum málsøkjum. Her skal einans undirvísingarøkið verða tikið fram, tí fyri vinnulívið hevur tað alstóran týdning at hava væl skúlað fólk á øllum økjum. Eisini á hesum øki er nú vorðið eitt stórt glopp millum føroyska og danska ella européiska undirvísingarverkið.

Í hesum parti av hesari frágreiðing verður dentur lagdur á at lýsa í stórum tær tillagingar, ið neyðugar eru at gera í Føroyum, um vit ynskja at gera okkara samvinnu við EF meira smidliga. Tættari samvinnan verður, størri verða neyðugu tillagingarnar, men samstundis er neyðugt at vísa á, hvørjar vinnuligar fyrimunir og vansar ymisku samvinnuhættirnir bera við sær. Einans tær týdningamestu lógartillagingarnar verða tiknar fram her.

## 2. Sáttmáli um fríhandilsskipan

### a. Lógartillagingar

Ikki ber til við vissu at siga, hvørjar lógartillagingar verða neyðugar í samband við eina møguliga fríhandilsavtalu millum Føroyar og EF.

Orsøkin til hetta er sum vera man, at vit ikki frammanundan við vissu kunnu siga hvussu ein slík fríhandilsavtala verður orðað, og á hvørjum økjum EF fer at krevja, at vit tillaga lóggávu okkara eftir hesari fríhandilsskipan.

Eftir teimum samráðingarfundum, sum hava verið, hava vit tó nakrar ábendirnar um hvussu henda avtala væntandi verður orðað, og kunnu vit tí eisini í ein ávísan mun meta um, á hvørjum økjum neyðugt verður við broytingum í verandi lógum okkara ella fremjan av nýggjari lóggávu.

Av týðandi lóggávuøkjum, sum væntandi verða ávirkað av einari fríhandilsavtalu kunnu nevnast hesi:

**Tolllóggávan**

Neyðugt verður at tillaga tolllógávu okkara soleiðis, at hon samsvarar við tær fyriskipanir um toll ella tollfrælsi á vørum úr EF-londunum, sum ásettar verða í fríhandilsavtaluni.

**Lóg um meirvirðisgjald (moms)**

Longu nú er greitt, at neyðugt verður í staðin fyri verandi reglur um innflutningsgjøld at seta í gildi eina ella aðra skipan, ið ikki ger mun á innlendskari og útlendskari framleiðslu. Hon kann t.d. líkjast teimum reglum um meirvirðisgjald (moms), sum galdandi eru m.a. í grannalondum okkara.

Landsstýrið hevur tí sett ein arbeiðsbólk, sum skal gera uppskot til eina slíka skipan.

**Lóg um eftirlit við útflutningi, referenceprísum og upprunareglum**

Við verandi samvinnu okkara við EF leggja teir alstóran dent á, at tann fiskavøra, sum útflutt verður til EF hevur føroyskan uppruna, og eingin ivi er um, at EF fer at krevja, at tann fiskavøra okkara, sum fevnd verður av fríhandilsavtaluni eisini skal hava føroyskan uppruna.

Vit kunnu eisini vænta, at EF fer at krevja, at settar verða í gildi lógarreglur, sum tryggja eitt munagott eftirlit við, at talan veruliga er um vøru av føroyskum uppruna.

**Avtøka av rakstrarstuðli**

EF leggur alstóran dent á, at tey lond, sum teir hava samvinnu við, ikki skapa fyrimunir fyri síni egnu virki, soleiðis at hesi virki verða betur fyri í kappingini mótvegis virkjunum innan EF.

Tað kann tí verða neyðugt at avtaka allan rakstrarstuðul til virki, sum við fríhandils- avtaluni koma at kappast við virkir innan EF.

**Prís og kappingareftirlit**

Fyri at tryggja seg móti ójavnari kapping fer EF væntandi at krevja, at vit seta í gildi lógarreglur, ið tryggja, at neyvt eftirlit verður við at reglurnar, sum skulu forða fyri ójavnari kapping veruliga verða hildnar.

Hetta fer at krevja munandi lógarbroytingar í mun til núgaldandi lóggávu okkara.

**b. Búskaparligar avleiðingar av eini fríhandilsskipan**

Endamálið við fríhandilsskipanum sum henni, ið vit nú samráðast um er at stimbra kapping, samhandil og arbeiðsbýti, at fáa ment búskaparliga vøksturin og bøtt um livilíkindini í londunum, fríhandilsavtalan fevnir um.

Verandi uppskot til fríhandilsskipan, ber **ikki** í sær frælsan handil fyri allar vørur. Av týdningi fyri Føroyar er, í hvønn mun útflutningur av okkara vanligu útflutningsvørum verður betri fyri, og í hvønn mun okkara innflutningskappandi ídnaður, handverk og tænastuvirksemi koma at klára seg í frælsum handli.

Frammanfyri er í punkt D greitt frá, hvat vinnufelagsskapir, virki og stovnar meta um búskaparligu avleiðingarnar av fríhandilsskipanini, og niðanfyri verður undir c og d stutt nomið við aftur metingarnar hjá Føroya Fiskasølu og Føroya Havbúnaðarfelag um ávirkanina á okkara útflutning av fiski og fiskavørum. Harumframt verða undir f. umrøddar kanningarnar og metingarnar, ið gjørdar eru um avleiðingarnar av handilsskipanini á heimaídnaðin.

Stutt sagt er niðurstøðan, at betraðu møguleikarnir fyri okkara útflutning ikki í bræði viga upp í móti negativu avleiðingunum á okkara heimaídnað. Hvørt tað sum frá líður ber til at fáa javnvág, kunnu ymiskar hugsanir vera um. Tað velst í stóran mun um mobilitetin hjá rávøru, arbeiðsmegi og kapitali.

**c. Metingar hjá Føroya Fiskasølu um uppskotið um fríhandilshandilsskipan**

Frammanfyri er í punkt D, pkt. 1, greitt nærri frá metingunum frá Føroya Fiskasølu, ið annars eru hjálagdar í fullum líki í 2. parti í hesari frágreiðing.

Vóru ongar avmarkingar fyri føroyskum útflutningi av fiski og fiskavørum til EF, eitt nú við kvotum, loftum og tolli, hevði Fiskasølan roknað við, at føroyski útflutningurin við sama rávørugrundarlagi vildi broytst soleiðis eftir 5 árum, at størri parturin av okkara útflutningi vildi verið fesk fløk og virkaðar fiskavørur, t.e. í báðum førum borðklárar vørur. Eftir fimm árum var føroyski útflutningurin av ávísum vørum vaksin við 400 mió. kr. í føstum prísum úr 1,22 mia. kr. upp í 1,65 mia. kr. ella við einum triðingi.

Fiskasølan heldur tó, at loftini á ísaðum fløkum og royktum vørum og kvoturnar á raspaðum vørum og niðursjóðaðum vørum í verandi sáttmálauppskoti verður ein stór forðing fyri, at útflutningsvøksturin kann vera fingin.

Møguleikarnir at selja rundan, feskan fisk av landinum verða eftir uppskotinum munandi betur enn í dag, tí tollurin á hesum til aðrar EF-marknaðir enn Danmark fellur burtur. Fiskasølan heldur tí, at tað verður trupult hjá føroyskum virkjum, ið framleiða virkaðar vørur, at kappast um rávøruna við útflutningin av rundum, feskum fiski.

Á vitjan síni í Íslandi fekk arbeiðsbólkurin ikki ta fatan, at íslendingar óttaðust hesa stóru kappingina. Í sambandi við áseting av kvotum til fiskifør, vóru íslendingar komnir eftir, at skuldi eitt íslendskt fiskifar, ið seldi veiðina feska uttanlands ikki vera verri fyri enn eitt, ið

seldi veiðina í Íslandi, so mátti tað hava 20% størri toskakvotu og 15% størri kongafiskakvotu enn hitt. So stóran mun gjørdi missur í veiðidagatalinum, kostnaður av sigling til og frá marknaði og svinn í vekt. Føroysk fiskiskip hava stytri leið á marknað uttanlands. Neyðugi meirprísurin nýtist tí ikki at vera so stórur sum hjá íslendingum fyri at tað skal loysa seg kortini at fara uttanlands at selja, og upp undir tvungnar dagar í havn, verður kravið til neyðugan meirprís enn minni. Í umrøðuni her í Føroyum av íslendsku kvotaskipanini hevur verið nevnt, at hon eggjar íslendskum skipum til at landa sína veiðu í Íslandi. Í framtíðar stýringini av føroysku fiskiveiðuni eigur longu nú at verða havt í huga, hvussu ymisk stýringaramboð ávirka hugin at lata skipini landa ávikavist í Føroyum ella í útlandinum (EF).

Meðan føroyingar og EF skulu ansa eftir, at tollkvotur verða hildnar, so er tað einans upp til EF at taka stig til at gera vart við, at tollloftini eru rokkin. Tað verður tískil mett, at tað lættliga ber til at selja meira enn tær nøgdir, ið tollloftini áseta, áðrenn tollur verður kravdur, tó hetta velst um marknaðarrøktina og hvussu væl hon er samskipað.

Hvat viðvíkur royktum fiskavørum liggur størsti meinbogin fyri útflutningi ikki í avmarking í kvotu, men í sølupolitikki okkara av feskum laksi. Framvegis kann allur aldur laksur verða seldur av landinum uttan mun til góðsku, og nústaðni verður serliga góður laksur seldur sum superior laksur. Hesin fær tryggjaðar 2 kr. betri prís pr. kg enn vanligur laksur, ið føroysku roykivirkini mugu nýta, meðan útlendsk roykivirki fáa væl bíligari rávøru.

Arbeiðsbólkurin heldur seg ikki til at siga, um føroyska alivinnan hevur fingið meira burtur úr førda sølupolitikkinum, enn um hon hevði valt t.d. norska sølupolitikkin, t.e. at ikki er loyvt at flyta út framleiðslulaks (sekunda), ið hervið gerst bílig rávøra hjá eitt nú norskum roykjaríum, meðan útfluttur laksur bert er fyrsta floks. Men bólkurin heldur seg kunna siga fyri vist, at tað ber ikki til at taka fløtið omanav báðum.

### d. Metingar hjá Føroya Havbúnaðarfelag um uppskotið um fríhandilsskipan

Onnur stóra útflutningsvinnan í Føroyum er alivinnan. Frammanfyri er í punkt D, pkt. 3, greitt nærri frá metingunum hjá Føroya Havbúnaðarfelag, ið annars eru hjálagdar í fullum líki í 2. parti í hesari frágreiðing.

Føroya Havbúnaðarfelag heldur, at uppskotið um fríhandilsskipan bøtir um umstøðurnar at flyta út feskan, rundan og frystan laks, ið annars longu sum er eru góðar.

Hin vegin bøtir uppskotið einki um møguleikarnar at flyta út meiri viðgjørdar vørur úr aldum laksi, eitt nú royktar og niðursjóðaðar vørur. Hetta metir Føroya Havbúnaðarfelag samfelagsliga vera ein bági sum frá líður, tí størstu vakstrarmøguleikarnir fyri aldum laksi liggja í smákeypmarknaðinum.

Arbeiðsbólkurin man ikki vera einsamallur at halda, at føroyska alivinnan stendur fyri rættiliga truplum tillagingum, ið fara at gera tað trupult hjá vinnuni at nýta teir fyrimunir til fulnar, ið kortini liggja á EF-marknaðinum. Fremst liggja hesir trupulleikar í samskipan, leiðslu og strukturi, í fíggjarligari orku og stýring hjá vinnuni, men harumframt í menning og positionering av føroyskum aldum laksi og marknaðarføring av honum.

Føroyska alivinnan er ikki nógv verri fyri enn alivinnan í øðrum londum, og eftir uppskotinum um fríhandilsskipan fara møguleikarnar ikki at verða verri enn teir eru í dag.

**e. Eftirlit við heilsuligu dygd á útfluttum matvørum**

Í fríhandilsavtaluni fara báðir partar at binda seg til ikki at diskriminera í heilsuligum og veterinærum málum. Hetta ber í sær, at vit skulu lúka EF-krøv á hesum økjum.

Sum greitt frá í viðmerkingunum frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sbr. frammanfyri í punkt D, 13, og í 2. parti, eiga vit at rokna við, at EF-nevndin fer at seta reglur um virkir, skip og fiskavørur, og harumframt fara krøv eisini at verða sett um krøv til almenna eftirlitið um eftirlitspraksis og -førleika og laboratoriiútbúnað og -støði. Megna vit ikki at skjalprógva eina eftirlitsskipan, ið EF kann góðkenna, koma vit undir beinleiðis eftirlit av serkønum frá EF-nevndini. At ganga undir hesi krøv hevði eisini verið neyðugt, um vit ikki fingu eina fríhandilsskipan, men kortini seldu til EF.

Truplari verður hjá okkum við fríhandilsskipanini at forða fyri innflutningi av eitt nú smolti, ið er heilsuliga góðkent í EF. Landsdjóralæknin hevur víst á henda trupulleika í sínum viðmerkingum, sbr. 2. part, eins og Føroya Havbúnaðarfelag.

**f. Kanningar og metingar av avleiðingunum av uppskotinum um fríhandilsskipan á innflutningskappandi vinnuna í Føroyum**

Týdningarmestu viðmerkingarnar um avleiðingarnar fyri innflutningskappandi vinnuna í Føroyum eru komnar frá Føroya Ídnaðarfelag, ið vísir til ta kanning, ið felagið saman við Føroya Handverksmeistarafelag og menningarstovuni lat gera. Greitt er frá hesum viðmerkingum í punkt D, pkt. 4. Viðmerkingarnar eru annars hjálagdar í fullum líki í 2. parti í hesari frágreiðing. Harumframt hevur Sjóvinnubankin latið margfaldað uppgávu hjá cand.merc.lesandi við Handilsháskúlan í Keypmannahavn um føroyska heimaídnaðin við EF-limaskapi ella undir fríhandilsskipan. Henda uppgáva er ikki partur av hesari frágreiðing, men fæst helst í bankanum. Heldur ikki er fyrrnevnda kanning, ið Føroya Ídnaðarfelag umrøður, partur av hesari frágreiðing.

Ein av truplastu tillagingunum hjá hesari vinnu er, at hon nú skal undir ta stóru tillaging, ið t.d Ísland fyri nógvum árum síðani byrjaði við at fara upp í EFTA. Við hesum limaskapi lagaði íslendski heimaídnaðurin seg til kapping á jøvnum føti við innfluttar útlendskar vørur. Íslendski heimaídnaðurin varð ikki stuðlaður eins og partar av tí føroyska, og møguleikarnir at gera gagn av komparativu fyrimununum í samhandli úteftir vórðu tí ikki fult so avbronglaðir sum í Føroyum.

Ta tillaging, ið heimaídnaðurin í Føroyum kundi havt framt við framhaldandi EFTA-limaskapi eftir 1972, ella við bert at gingið somu leið sum EFTA, noyðast vit nú at gera uttan mun til hvat tilknýti vit fáa til EF. At uppskotið um fríhandilsskipan við EF krevur tað, kunnu vit bert taka sum eina góða umbering. Verandi skipan hjá okkum at stuðla vinnum rakstrarliga hevur longu tikið nóg ilt fyri seg.

Samstundis skal sigast, at fleiri av framleiðslunum fáa betri og greiðari umstøður við nýggju

toll- og avgjaldsskipanunum, ið fara at verða settar í verk í sambandi við sáttmálan um fríhandilsskipan. Tó at hesir fyrimunir ikki verða so stórir, at teir viga upp í móti avleiðingunum fyri hinar framleiðslurnar, heldur arbeiðsbólkurin, at teir fara at bøta væl um kappingarførið og menna leiðslur og virki.

**g. Reglur um uppruna á vørum**

Frammanfyri er í punkt E, 5, greitt frá at ein sáttmáli um fríhandilsskipan millum lond ber í sær, at frælsið einans snýr seg um vørur og tænastur, ið hava sín uppruna í londunum, fríhandilsskipanin fevnir um.

Í tí uppskoti, ið liggur fyri, halda føroyingar, at reglurnar um uppruna á okkara fiskavørum geva okkum í so lítið rásarúm við kravinum um fullan føroyskan uppruna. Tó at arbeiðsbólkurin eisini hevði vilja havt okkum frægari sømdir, so metir hann ikki, at tað slepst longur.

Við at miða ímóti fríhandilsskipan við EF hava Føroyar vilja varðveitt handilspolitiskt frælsi mótvegis øðrum marknaðum enn EF, og har verða vit so at royna at selja tær framleiðslur, ið ikki hava fullan føroyskan uppruna.

**h. Reglur um landskassastuðul og antidumping**

Valuta- og prísráð Føroya hevur gjørt eina sera gjølliga frágreiðing um ríkisstuðul, príspolitikk, kappingarreglur og alment keyp í EF. Umstøður hava ikki verið hjá bólkinum at fáa hana út sum kunning, men hon er hjáløgd í 4. parti av hesari frágreiðing.

Frágreiðingin lýsir tær bindingar, ið eru neyðugar hjá pørtunum at ganga undir, um endamálið við fríhandilsskipanini skal røkkast, nevniliga **í mestu virðing fyri javnbjóðis kappingarumstøðum at tryggja góðan vøkstur í samhandlinum** landanna millum.

Kappingarreglurnar hjá EF, sbr. greinirnar 85, 86, 90 og 92 í Rómarsáttmálanum, fara tí at verða nýttar av EF í okkara viðurskiftum, og annað enn at gera seg kunnugan við hesar reglur og laga seg eftir teimum vil tí vera burturvið.

Greinirnar 85 og 86 snúgva seg um slíkar avmarkingar í kappingini í vinnulívinum, ið kunnu órógva samhandilin millum londini. Reglurnar í greinunum eru galdandi fyri øll vinnuvirki, og tey eiga tí at kenna hesar reglur og laga sítt virksemi eftir teimum. Greinirnar báðar miða ímóti at tryggja og fremja kappingina, men á hvør sín hátt. Meðan grein 85 vendir sær ímóti avtalum ella skipaðum virksemi millum tvey ella fleiri vinnuvirki, vendir grein 86 sær ímóti teirri misnýtslu, ið monopol ella serliga sterk vinnuvirki kunnu fremja við kraftarmiklu støðu síni á marknaðinum.

Men kappingin kann eisini verða avlagað, um eitt land gevur vinnuvirkjum hjá sær fyrimunir, eitt nú við at veita teimum stuðul, annaðhvørt beinleiðis sum vit kenna tað hjá okkum ella við lættum í t.d. skatti ella øðrum gjøldum. Slíkar avlagingar eru umrøddar í grein 92, men sjálvt um brot á slík stuðulsbann mest verður søk hjá landinum at greiða, so kunnu vinnuvirkini fáa álagt at rinda ólógliga fingnan stuðul aftur.

Sum eitt dømi um týdningin, ið ymisk brot á kappingarreglurnar hjá EF kunnu fáa, kann verða víst á, at málið um metta norska dumping av laksi á EF-marknaðinum varð tikið upp eftir kappingarreglunum hjá EF.

### 3. Tollsamgonga

#### a. Inngangur

Ein tollsamgonga er eyðkend við, at partarnir ganga saman um felags tolløki, hava felags toll mótvegis øðrum londum, ið ikki eru við. Ein tollsamgonga fevnir vanliga um øll vørusløg, men hetta er ikki neyðugt. Millum londini í tollsamgonguni er tollur ikki á teimum vørum, tollsamgongan fevnir um. Felagsmarknaðurin er dømi um tollsamgongu. Tollinntøkan fer í EF-kassan, men tollinntøkan verður munandi minni enn í dag, tí innflutningsgjøldini verða skipað t.d. sum momsur.

Í 13. kunning, sí 4. part av hesari frágreiðing, er greitt frá, hvat tollsamgonga ber í sær, og somuleiðis er greitt frá hesum í tilfarinum frá danska uttanríkismálaráðnum, "Færøerne - EF. Alternative tilknytningsformer", hjálagt í fullum orðaljóði í 3. parti.

#### b. Lógartillagingar

Væntandi verður neyðugt við somu lógartillagingum, sum nevndar eru frammanfyri undir 2. petti, tó soleiðis at vit við slíkari skipan sleppa undan spurninginum um upprunareglur.

Harumframt verður neyðugt, við nágreiniligum reglum, at tillaga tolllóggávu okkara eftir hesari skipan við felags tolløki við EF, og felags tolli mótvegis øðrum londum.

Her er talan um munandi broytingar í mun til núgaldandi tolllóggávu okkara.

#### c. Búskaparligar avleiðingar av tollsamgongu

Føroya Reiðarafelag hevur í sínari meting um búskaparligu avleiðingarnar av tættari tilknýti við EF, sbr. frammanfyri í punkt D, 2, gjørt vart við, at tollsamgonga kanska er tann tilknýtisháttur, ið hóvar okkum best, um hon eisini hevði umfatað allar fiskavørur. Viðmerkingarnar frá Føroya Reiðarafelag eru í fullum líki tikin við í 2. parti av hesari frágreiðing.

Ið hvussu so er vil tollsamgonga loysa trupulleikan við upprunareglum, tí Føroyar vera tá partur av EF í tollsamanhangi. Rundur, frystur fiskur og rækjur frá triðjalondum vil koma inn undir somu tollviðgerð/upprunareglur sum í EF. V.ø.o. verður virðisøkingin í Føroyum ikki tollað, uttan so, at lidna vøran ikki var fevnd av tollsamgonguni. Í hesum samanhangi er vert at minnast til at Grønland og EFTA verða í fríhandilsskipanini mett ájavnt við triðjalond.

Hvat dýrkingin fyri føroyska samfelagið í tollsamgongu vil verða av, at innflutningur úr

londum uttanfyri EF kemur undir EF-toll, hevur EF-arbeiðsbólkurin ikki kannað. Her velst um, hvussu mong EFTA-lond taka stig til EF-limaskap. Ymiskur innflutningur úr verandi EFTA-londum og úr londum uttanfyri EF og EFTA verður tó dýrari, og tað hevur fyrr verið roknað við sum vist, at vit ikki kundu keypt landbúnaðarvørur úr EF við niðurgreiðslustudningi, fóru vit upp í tollsamgongu við EF. Fingu vit somu tollsamgongutreytir sum Andorra, kundu vit tó varðveitt henda møguleika.

Týdningurin av niðurgreiðslustudninginum hjá EF á landbúnaðarvørur saman við minni tolli av bíligaru vørunum er fyri Føroyar mettur til góðar 43 mió. kr., sbr. viðmerkingarnar frá Føroya Bjór, Miklagarður/SMS og P/f Poul Hansen/P/f Krás í punkt D, 8, 9 og 10, frammanfyri og sum annars eru tiknar við í fullum orðaljóði í 2.parti.

Útlitini fyri at tað ber til í dag at samráðast við EF um eina vanliga tollsamgongu, mugu tó metast smáir, og ivamálini eru sum frammanfyri víst á mong. Tá tykjast tær nýggju skipanirnar, ið oyggjasamfeløg og onnur smáfeløg eftir øllum at døma fáa, meira áhugaverd.

### 4. Associering ella onnur serskipan

#### a. Inngangur

Í 13. kunning er greitt frá, hvat ein associeringsskipan ella onnur serskipan við EF kann hugsast at bera í sær. Ein associeringsskipan vil annaðhvørt verða fingin í lag sum ávegis stig móti dyggum sambandi við EF ella bert viðvíkja økjum, har serligur tørvur er fyri samstarvi við EF. Somuleiðis er í tilfarinum frá danska uttanríkisráðnum, "Færøerne-EF. Alternative tilknytningsformer", greitt frá associeringsskipanum, har víst verður á, at tær skipanir, ið nú verður samráðst um við Póland, Ungarn og Tjekkoslovakia verða nevndar associeringsskipanir.

Í umrøðuni av møguligum hóskandi skipanum millum Føroyar og EF hava ymsir aðrir sambandsmøguleikar við EF verið rættiliga nógv frammi. Í 12. kunning er greitt frá slíkum og í frammanfyrinevnda notati, "Færøerne-EF. Alternative tilknytningsformer", eru slíkir ymiskir sambandsmøguleikar gjølliga umrøddir.

Serliga áhugaverdar eru skipanirnar við Man og Ermarsundsoyggjarnar, ið ikki eru limir í EF, men tó í tollsamgongu við EF, og skipanirnar, ið verða umhugsaðar við Kanariaoyggjaranar, Madeira og Asorurnar, ið eru í limaskapinum, men ikki eru fevndar av tollsamgonguni, landbúnaðar- og fiskivinnupolitikkinum hjá EF.

Okkara áhugi fyri hesum serskipanum hevur fremst verið fyri at finna fram til, um tær kunnu nýtast sum fyridømi fyri sersømdum í okkara fríhandilsavtalu og kanska eisini um tær geva vón um sersømdir í framtíðini. Higartil hevur tó einki bent á, at vit hava kunna nýtt serskipanirnar at fáa sersømdir.

#### b. Lógartillagingar

Eitt og hvørt formligt samstarv við onnur lond ella millumtjóða felagsskapir, sum t.d. EF

gera tað neyðugt hjá okkum at tillaga lóggávu okkara eftir hesum samstarvi.

Í hvussu stóran mun neyðugt verður við lógarbroytingum velst um innihaldi av tí skipan ella samstarvi vit fáa í lag við EF, og kunnu vit tí ikki frammanundan siga nakað nágreiniligt um á hvørjum økjum hesar lógartillagingar verða framdar.

**c. Búskaparligar avleiðingar**

Gitingar um búskaparligu avleiðingarnar av ymsum serskipanum verður helst bert heilaspuni, so ymiskar tær eru og so ymiskar fortreytirnar eru fyri teimum.

Føroyar kunnu ikki samanberast vit eitt nú Kanariaoyggjarnar, Madeira og Asorurnar, har livistandardurin er undir helvt av okkara, og við verandi tollsamgongu millum Man, Ermarsundsoyggjarnar og EF ber innmarknaðurin ikki somu tillagingar hjá hesum oyggjum sum okkara serskipan eftir tykki EF's hevur tørv á.

Kortini heldur arbeiðsbólkurin seg til at siga, at tað er av avgerandi týdningi, at vit nú fáa víttgangandi samstarvsavtalur við EF á undirvísingar-, granskingar-, menningar- og mentanarøkinum. Slíkar avtalur kunnu gerast sum partur av fríhandilsavtaluni ella óheft av henni, men fáa vit ikki slíkar avtalur, so er arbeiðsbólkurin ikki í iva um, at hetta fær negativar búskaparligar avleiðingar fyri Føroyar.

Frammanfyri er í punkt D, 11 og 12, greitt frá viðmerkingunum frá Fróðskaparsetri Føroya og Landsskúlafyrisitingini um slíkar neyðugar samstarvsavtalur, sbr. eisini fulla orðaljóði av viðmerkingunum hjá hesum stovnum í 2. parti, og hesi sjónarmið eru endurtikin í viðmerkingunum frá Fróðskaparsetrinum í 3. parti til tað tilfar, ið er komið frá danska kenslumálaráðnum, og er fyrr nevnt í viðmerkingunum frá menningarstovuni, endurgivin í 2. parti.

EF-arbeiðsbólkurin hevur varhugan av, at tær oyggjar og teir oyggjaflokkar (Korsika, Sardinia, Burgundarhólmur, Hetland, Orknoyar og Suðuroyar), ið eru fult fevndir av reglunum hjá EF, eru ikki í búskaparligari framgongd ella hava vaksandi fólkatal, meðan Man og Ermarsundsoyggjarnar, ið hava serskipanir klára seg betur. Framum hesar seinast nevndu eru Føroyar egin tjóð við egnari mentan. Hetta gevur størri møguleikar og førleika í samstarvi, og eigur ikki at verða nýtt til at gera heimabeitið trengri og til at forða okkara ungu at fáa eina fakliga kappingarføra útbúgving og okkara virkjum at fáa lut í granskingar- og menningarúrslitunum í EF.

**5. Serstøk føroysk EBS-skipan við EF - ella EBS-skipan við EFTA-limaskapi**

**a. Inngangur**

EFTA-londini samráðast í hesum døgum um endaligu orðingarnar í eini møguligari EBS-skipan við EF. Innihaldið í slíkari serskipan - fingust líkinda seravtalur fyri Ísland og Føroyar á fiskivinnuøkinum, ið er aðallívsgrundarlag teirra, hóskar munandi betur til okkara

framkomna samfelag enn tær undir 4 nevndu skipanir.

Í 16. kunning er greitt nærri frá EBS-skipanini og hvussu Ísland fyrireikar seg til at taka ímóti avbjóðingunum í slíkum samstarvi við EF. Somuleiðis er í notatinum frá Udenrigsministeriet um "Alternative tilknytningsformer" greitt frá EBS-skipanini (Europæisk Økonomisk Samarbejdsområde).

Tá EFTA tók upp samráðingar við EF um européiska búskaparliga samstarvsøkið og í fyrireikingunum samtykti, at fríhandilin millum limalondini eisini skuldi umfata fiskavørur, vóru møguleikarnir fyri at Føroyar fóru upp í EFTA umhugsaðir av dønum og føroyingum. Gjøllig frágreiðing er til skjals um tær metingar, ið tá vóru gjørdar í 1989, og tyktust størstu trupulleikarnir fyri slíkum limaskapi - vildi EFTA annars taka Føroyar upp í - at vera av fólkarættarligum slagi. Hildið varð, at slíkur limaskapur illa vildi hóska inn í ríkisfelagsskapin, rættarliga og politiskt. Meira varð ikki gjørt burtur úr hesum møguleika tá, men EF-arbeiðsbólkurin tók á fundi við umboð fyri uttanríkisráðið í apríl 1991 spurningin uppaftur, tí ein EBS-skipan hevði loyst fleiri av teimum ynskjum um framtíðar menning, ið ikki liggja so greiðir í fríhandilsskipan, tollsamgongu og tillaging av verandi skipan.

Ein EBS-skipanarlík avtala millum Føroya og EF, har Føroyar fingu somu sømdir sum Ísland, hvat fiskivinnu viðvíkur, hevði verið verd at kanna møguleikarnar fyri, annaðhvørt tað best gjørdist við limaskapi í EFTA ella serstakt millum Føroyar og EF. Vóru vit partar av EFTA var umsitingin av skipanini helst lættari.

**b. Lógartillagingar**

Ein EBS-skipan skal tryggja, at fólk, vørur, tænastur og kapitalur hava frítt at fara innan samstarvsøkið. Tað er tí neyðugt at avtalan verður grundað á rættarskipanir, ið partarnir í felag semjast um, og í hesum førinum mest EF-rættur. Undantøk kunnu verða gjørd, har avgerandi áhugamál hjá pørtunum gera tað neyðugt, sum í okkara og føri Íslands fiskivinnuøkið.

Í samband við tær samráðingar um slíka skipan, sum nú fara fram millum EF og EFTA tykist tí semja vera um, at týðandi partar av EF-rættarreglunum skal verða galdandi eisini fyri EFTA-londini.

Við slíkari skipan verður tí neyðugt hjá okkum, at laga stóran part av lóggávu okkara eftir teimum rættarreglum, sum galdandi eru í EF, umframt at vit eisini framyvir skulu tillaga lóggávu okkara eftir EF-rættinum.

Viðmerkjast kann í hesum sambandi, at íslendingar hava sagt, at Ísland skal vaksa um lógarverk sítt úr 2.000 síðum upp í 11.000 síður.

**c. Búskaparligar avleiðingar**

Búskaparligu avleiðingarnar av einari EBS-skipan verða principielt nakað tær somu sum av

einari fríhandilsskipan. Tó verður eisini - við fáum avmarkingum - frítt at fara hjá kapitali, tænastum og arbeiðsmegi. Sum nevnt frammanfyri verður EF-rættur í stórum galdandi.

Vert er at nevna, at íslendingar - sbr. 16. kunning - eru komnir eftir, at ídnaðurin har bert fær fyrimunir av einari EBS-skipan, men eins og her skilir ídnaðurin, at áhugamálini hjá fiskivinnuni fremst skulu røkjast.

## 6. Føroyskur limaskapur í EF

### a. Inngangur

Sum greitt frá frammanfyri í hesum parti og sum nomið við í parti C, 5, eru ymiskir fyrimunir og vansar við øllum teimum mongu samstarvsmøguleikunum við EF, sum eru umrøddir, tillagað verandi skipan, fríhandilsskipan, tollsamgonga ella serskipan.

Uppskotið um fríhandilsskipan verður eftir ætlan endaligt í seinnu helvt av juni 1991, og støða kann tá verða tikin til tað. Men vóru hinir møguleikarnir betri kendir, hevði kanska verið ilt at valt ímillum teir og fríhandilsskipanina.

Harafturímóti kennir arbeiðsbólkurin seg fullvísan í, at skuldu føroyingar í dag tikið støðu fyri ella ímóti limaskapi, so hevði úrslitið verið eins og á løgtingið 9. apríl 1973, nevniliga "at føroysk luttøka í EF undir verandi treytum, serliga hvat fiskirættindunum viðvíkur, ikki er ráðilig".

So víttfevnandi sum EF er vorðið, og so protektionistiskt sum felagsskapurin virkar mótvegis teimum, sum ikki eru partar av honum, hevur arbeiðsbólkurin hildið tað verið neyðugt at fingið til vega so gjølligar metingar sum til ber, um tær avleiðingar, ið føroyskur limaskapur í EF hevði fingið fyri Føroyar. Við støði í hesum ber eisini til hjá tí einstaka at gera sær sínar hugsanir um teir trupulleikar, ið standast av at vit ikki eru limir, og um, hvussu vit skulu loysa teir, eitt nú við serskipanum.

Nevndu metingar eru fremst fingnar frá danska uttanríkisráðnum, ið annaðhvørt tað sjálvt hevur gjørt ella hevur fingið aðrar danskar ráðharrastovur at gjørt, men harumframt eru í flestu kunningunum frá arbeiðsbólkinum dentur lagdur á at víst á avleiðingarnar fyri Føroyar.

Avleiðingarnar av limaskapi meira alment eru lýstar í hesum notatum:

Justitsministeriets notat af 22. marts 1991 vedr. jordlovgivning og personret m.v.

Skatteministeriets notater af 7. marts 1991 vedr. momsharmoniseringen i EF, af 28. februar 1991 vedr. EF-harmoniseringsbestræbelser for punktafgifter og af 11. marts 1991 om skatteharmoniseringen i EF.

Økonomiministeriets notits af 20. marts 1991 om eventuelle ændringer i de specielle færøske valutaforhold som følge af dansk deltagelse i en økonomisk og monetær union.

Udenrigsministeriets notits af 18. februar 1991 om EF's energipolitik.

Udenrigsministeriets notat af 27. marts 1991 vedr. konsekvenser for hjemmestyret af evt. medlemsskab, samt mulighederne for påvirkning af EF-beslutninger.

Udenrigsministeriets redegørelse af 9. april 1991 for generelle aspekter Færøerne-EF.

Udenrigsministeriets notat af 12. februar 1991 vedr. EF's indre marked og eventuelle virkninger heraf for Færøerne.

Udenrigsministeriets notat af 3. april 1991 vedr. "Borgernes Europa"; Konsekvenser af eventuelt færøsk medlemsskab i forhold til ikke-medlemsskab.

**b. Lógartillagingar**

Við møguligum føroyskum EF-limaskapi gerast EF-fyriskipanir (forordninger) partur av rættargrundarlagi okkara, soleiðis at skilja, at hesar fyriskipanir verður beinleiðis galdandi rættur í Føroyum.

Harumframt hava vit skyldu til at tillaga alla lóggávu okkara eftir ásetingunum í núgaldandi og komandi EF-direktivum.

EF hevur samtykt eina rúgvu av direktivum innan sera týðandi lógarøkir, og verður tí neyðugt við sera umfatandi lógarbroytingar í mun til núgaldandi lóggávu okkara.

Sum dømi um slík lógarøkir kunnu nevnast:

**Partafelagslógin**

Við 14 direktivum hevur EF í stóran mun samskipað reglurnar, sum galdandi skulu vera fyri hetta lógarøki.

Høvuðsendamálið við hesum EF-direktivum er sambært grein 54 stk. 3 í Rómarsáttmálanum, at tryggja, at partaeigararnir, kravánarar og teir, sum annars hava handilsligt samband við felagið eru líka væl vardir, uttan mun til í hvørjum limalandi felagið er skrásett.

Nevndu direktiv hava nærri ásett reglur um t.d. stovnseting, inngjalding av partapeningi, hækkan av partapeninginum, egin partabrøv, leiðsla partafelagsins, aðalfundur, verja av partaeigaraminniluta, roknskap, samanlegging og avtøka av partafeløgum.

**Toll- og avgjaldslógir**

Í sambandi við, at allar handilsforðingar skulu beinast burtur verður neyðugt at laga toll- og avgjaldslóggávu okkara eftir hesum umstøðum.

**Arbeiðs- og uppihaldsloyvi**

Fríur flutningur av arbeiðsmegini er ein av teimum sokallaðu frælsunum í EF, og verður tí neyðugt hjá okkum at tillaga lóggávu okkara eftir teimum direktivum, sum EF hevur samtykt innan hetta øki.

**Almannalóggávan**

Innan EF verður eisini arbeitt við at samskipa almannalóggávuna, og at tryggja borgarum í limalondunum ávís rættindi í hinum limalondunum.

Hesi rættindi byggja á hesi høvuðssjónarmið:

- líkarætt fyri allar EF-borgarar,

- at persónur, tá hann flytir í annað EF-land ikki skal missa vunnin rættindi,

- at almannahjálp skal veitast uttan mun til hvar í EF borgarin er búsitandi,

- og sonevnda pro rata temporis-sjónarmiðið, sum gevur rætt til lutfalsliga veiting, um borgarin - tá hann skiftir arbeiðsstað - ikki hevur vunnið rætt til fulla almannaveiting.

**Kappingarlóggávan**

Rómarsáttmálin setir bann fyri, at virki gera avtalur, sum kunnu skapa ójavna kappingarstøðu í vinnuni, og at virki misnýta sína styrki til at skapa sær slíkar kappingarfyrimunir.

Eisini setir Rómarsáttmálin bann fyri, at limalondini skapa kappingarfyrimunir fyri ávís virki við at veita teimum rakstrarstuðul.

Við heimild í Rómarsáttmálanum hevur EF sett í gildi fleiri fyriskipanir, sum sostatt eru galdandi í limalondunum.

Her er talan um munandi broytingar í mun til ta lóggávu, sum nú er galdandi í Føroyum, og vit skulu her hava í huga, at EF-rætturin er galdandi fram um tjóðarlóggávu limalandanna.

Gjøgnumgongd av kappingarlóggávuni fæst í útgreiningini frá Valuta- og Prísráði Føroya í 4. parti.

**Umhvørvislóggávan**

EF hevur samtykt fyriskipanir og direktiv, sum hava til endamáls at verja og betra støðið innan umhvørvi, at verja heilsuna hjá fólki og at tryggja, at náttúrríkidømið verður nýtt við skili.

Við limaskapi skulu vit tillaga okkara lóggávu eftir hesum fyriskipanum og direktivum.

**Orkuspurningar**

Í Rómarsáttmálanum eru ongar serligar reglur um orkuspurningin.

EF hevur tó, við støði í vanligu heimildarreglunum roynt at skipa ein felags orkupolitikk.

M.a. eru samtyktar reglur, sum miða móti sparingum innan orkuøkið og fremjan av nýggjari orkutøknifrøði.

Hesar samtyktir fara tó neyvan at hava stórvegis beinleiðis ávirkan á Føroyar, men á hesum sum á so mongum økjum mugu vit taka við felags avgerðunum, um so er, at vit gerast limir.

**Persónrætturin**

Danska løgmálaráðið hevur í útgreining, "notat af 22. marts om jordlovgivning og personret m.v. med bilag", sum er løgd fram í 3. parti av hesari frágreiðing, viðgjørt spurningin um persónrættin hjá føroyingum sum danskir ríkisborgarar, í sambandi við at Danmark er limur í EF, og Føroyar eru uttanfyri.

Sambært hesari útgreining eru føroyingar, sum hava fastan bústað í Danmark at meta sum EF-borgarar, meðan føroyingar, sum búsitandi eru í Føroyum, ikki hava hesa rættarstøðu.

Hesin munur fellur burtur, um Føroyar gerast limur í EF og allir føroyingar sostatt gerast EF-borgarar.

**Undirgrundin**

Sum kunnigt samráðast Føroyar og Danmark í løtuni um rættin til undirgrund okkara.

Ein týðandi spurningur í sambandi við limaskap okkara er, hvørja ávirkan limaskapur fer at hava á ræði okkara á undirgrundini og tí tilfeingi, sum har er.

Hetta er ein spurningur, sum ivaleyst verður at taka upp í sambandi við samráðingarnar um slíkan limaskap.

**Samskipan av lóggávu**

Sambært Rómarsáttmálanum kann EF seta í gildi fyriskipanir og direktiv, ið skulu samskipa tjóðarlóggávuna, har hetta er neyðugt fyri at tryggja skipanina og menningina av EF.

Sum dømi um hesa samskipan kunnu nevnast royndirnar at beina burtur allar tekniskar handilsforðingar.

Fleiri direktiv eru samtykt, og limalondini hava skyldu at laga lóggávu sína eftir hesum direktivum.

**Heimastýrið**

Týðandi partar av lóggávuheimildini verður, í sambandi við limaskap í EF, fluttar úr tjóðartinginum í EF-stovnarnar.

Ein spurningur, sum stingur seg upp í sambandi við møguligan føroyskan limaskap, er, hvussu heimildirnar verða býttar millum EF-stovnarnar, danska Fólkatingið og løgtingið.

Við verandi ríkisrættarligu støðu okkara verður neyðugt, at hesir spurningar verða greiddir í samráðingunum um limaskap.

**c. Búskaparligar avleiðingar**

Fullur limaskapur við tollsamgongu ber sjálvsagt í sær, at ongar forðingar verða fyri føroyskum útflutningi til felagsmarknaðin, og at vit kunnu laga okkara framleiðslu júst eftir hesum marknaði. Í hvønn mun henda ótarnaða atgongdin til marknað uppá u. 350 mió. fólk gevur okkum størri búskaparligar fyrimunir valdast sjálvsagt okkara førleika og dugleika at marknaðarføra okkara vørur, okkara kappingarføri og okkara møguleikar sjálvir at gera burtur úr okkara rávøru.

Á innkomnu svarunum og útgreiningunum frá virkjum, stovnum og feløgum hevur limaskapsmøguleikin ikki verið stórvegis viðgjørdur.

Útgreiningin frá Føroya Fiskasølu má skiljast soleiðis, at í fríari kapping og ótarnaðum møguleika at selja á EF-marknaðinum skuldi borið til at økt útflutningsvirðið á fiskavørum í føstum prísum og við óbroyttari veiðinøgd undantikið vøkstur í alivinnuni við út við 33% eftir 5 árum.

Føroya Reiðarafelag tykist ikki vera so bjartskygt um okkara kappingarføri, tá ongar forðingar verða fyri at landa veiðina runda og feska á marknaði niðri á meginlandinum.

Føroya Havbúnaðarfelag metir limaskapin geva nógvar fyrimunir, eitt nú fyri aling av ælabogasílum og útflutningi av roykturn laksavørum og meiri viðgjørdum laksavørum. Harumframt kunnu vit helst fáa gagn av EF-stuðlaðari gransking innan alivinnuna, av fríari kapitalflutningi og av fríari kapping innan trygging, ið kann geva alibrúkunum betri og

bíligari tryggingar. Trupulleikar kunnu tó verða í fóðurkeypi uttanfyri EF og í felags heilsuligum krøvum til smolt og eygarogn.

Sjónarmiðini hjá Føroya Ídnaðarfelag og Føroya Handverksmeistarafelag eru ikki ólík teimum hjá íslendskum ídnaði og handverki, ið tó hava lagað seg til fríhandil við limaskapi í EFTA og fríhandilsavtalu við EF. Føroysku feløgini vísa á, at fleiri føroyskar ídnaðar- og handverksfyritøkur fáa rættiliga stórar trupulleikar í fríhandilsavtalu, tollsamgongu ella limaskapi, og at talið av handverkarum og arbeiðsfólki í ídnaðinum, ið má finna nýtt arbeiði verður stórt. Hetta fær eisini ávirkan á møguleikarnar at fara í handverkslæru. Skal føroyskur ídnaður og handverk klára seg í frælsari kapping við útlendskar er neyðugt at fortreytirnar eru líkar. Sum er verða vinnurnar darvaðar í kappingini av høgum kostnaðarstøði, eitt nú høgum arbeiðslønum, rávøruprísum, orkuprísum, grundstykkja- og íløguprísum. Men eisini tænasturnar, ið handverk og ídnaður skal keypa, mugu undir somu kapping, og hetta ber í sær broytingar í lóggávu innan trygging, bankavirksemi, grannskoðan v.m. Feløgini tykjast meta, at somu kappingarfortreytir sum tær, kappingarneytarnir hava, verða best fingnar í limaskapi.

Fyri landbúnaðin, virki, ið virka úr landbúnaðarvørum, og fyri brúkaran verður limaskapur eitt greitt afturstig. Tað er óhugsandi, at føroyskur landbúnaður kann fáa gagn av landbúnaðarpolitikkinum hjá EF og serligu stuðulsskipanum hansara, og limaskapur ber í sær, at tað fer ikki at bera til at keypa bíligar landbúnaðarvørur við niðurgreiðslustuðli úr EF. Hetta seinna ávirkar kappingarførið hjá matvøruvirkjum, bryggjaríum og kostnaðin á matvørum annars. Føroya Jarðarráð ivast í, um landbúnaðinum verður lív lagað sum vinna, verða Føroyar fullur limur í EF, men ið hvussu so er eiga vit nú at fremja lóg um landsplanlegging, sum ásetir, hvar landbúnaðarjørð er og skal vera, lóggávu, sum ásetir nýtsluna av landbúnaðarjørðini, bústaðar- og framleiðsluskyldu, jarðarlóg og endurskoðaða lóg um jarðargrunnin. Tó at landbúnaðarvinna verður trupul, so skal jørðin tó røkjast og verjast, og til tað hevur tað skund at fáa slíkar lógir.

Búskaparligu fyrimunirnir av limaskapi eru sum tað skilst ikki eyðsýndir, tó at tað fyri handverk og ídnað tykjast at vera fyrimunir sum frá líður, tá stóru tillagingarnar eru hendar. Møguleikarnir hjá fiskiídnaðinum at klára seg so væl sum Fiskasølan metir, valdast á hvønn hátt fiskiveiða við Føroyar verður skipað.

**d. Fiskivinnupolitikkurin**

Frammanfyri er í punkt F, 6.2, greitt frá, hvørjar hugsanir eru frammi um endur-skoðan av fiskivinnupolitikkinum hjá EF. Einki bendir á, at avtalaða endurskoðanin í 1992 verður til fyrimunar fyri okkara ynski um fult ræði á fiskigrunnunum. Fiskivinnupolitikkurin hjá EF tykist læstur fastur, tí ringt er at fáa kvalificeraðan meiriluta, ið krevst at broyta hann.

Spania og Portugal hava við røttum víst á, at verandi fiskivinnupolitikkur stríðir ímóti grein 7 í Rómarsáttmálanum, og vit eiga at fylgja væl við í tí rættarmáli, sum av hesum hevur tikið seg upp. Vinna Spania og Portugal er sjálvt tann seinasta verjan, vit hava við søguligum rættindum, fokin.

Úr slíkari støðu kann ein nýggjur fiskivinnupolitikkur sjálvsagt spyrjast, ið gevur strandaríkjunum størri vald á havinum hjá teimum, soleiðis sum danski fiskimálaráðharrin hevur talað fyri. Men einki bendir á, at ein slíkur politikkur verður veruleiki í bræði.

**e. Fíggingarvinnurnar**

Hava vit ikki longu framt broytingar í okkara banka- og sparikassalóggávu og í okkara tryggingarlóggávu, so verður hetta neyðugt í samband við møguligan limaskap. Hvørt hesar lógarbroytingar ella limaskapur gevur føroyskum bankum, sparikøssum og tryggingini størri kapping, velst um áhugan hjá útlendskum fyritøkum. Sum er hava tær bert verið forðaðar á tryggingarøkinum. Eitt tykist tó greitt, og tað er, at við somu lóggávu annars og í fullum limaskapi fer illa at bera til at halda fast við okkara rentuskattaskipan.

**f. Telesamskifti**

Generaldirektoratet for Post- og Telegrafvæsenet hevur 11. marts 1991 í hjálagda (í skjali 4) "Bidrag fsv. angår telekommunikations- og radio/tv-områderne til udredningsarbejdet med henblik på Færøernes revurdering af forholdet til EF" givið gjøllar frágreiðingar í "Notat af 7. marts 1991 vedrørende konsekvenser for Færøerne af indførelse af EF-retsakter om radio og fjernsyn" og í "Notat af 7. marts 1991 vedrørende konsekvenserne for Færøerne ved indførelse af EF-retsakter på telekommunikationsområdet".

Samskipan av reglunum krevur lógartillagingar í Føroyum á sjónvarpsøkinum, meðan EF-reglurnar viðv. telesamskifti koma at broyta einkarstøðuna hjá Telefonverki Føroya Løgtings og bera við sær lógartillagingar og broyttar kappingarumstøður.

**g. Beinleiðis búskaparligir fyrimunir av EF-limaskapi**

Í kjakinum um Føroya støðu mótvegis EF hevur verið ført fram, at vit við limaskapi kundu fingið part í veitingunum frá stóru útbyggingargrunnunum hjá EF. Víst hevur verið til Hetlands, Orknoyar, Norðurskotland og eisini til Jútlands, ið hava fingið ávísar fyrimunir frá hesum grunnum.

EF-arbeiðsbólkurin ræður frá at rokna við slíkum játtanum, uttan í serligum førum. Til tess er - og vónandi verður - okkara búskaparliga, útbúgvingarliga og infrastrukturella støða alt ov góð til at vit kunnu rokna okkum millum tey øki og landspartar, ið hava slíkan stuðul fyri neyðini.

Tó er ikki óhugsandi, at vit innan nýggjar vinnur sum alivinnu og ferðamannavinnu kunnu fáa gagn av almenna politikkinum hjá EF á hesum økjum.

**h. Gjøld til EF**

EF er eisini ein tollsamgonga, og tí fara sum í tollsamgongu nevnt frammanfyri tollinntøkurnar í EF-kassan.

Hetta er ikki nóg mikið til at gjalda útreiðslur EF's, og tí er eisini ásett, at partur av momsgjaldinum hjá limalondunum skal rindast í EF-kassan. Mett út frá inntøkunum hjá EF í 1985, tykist eitt føroyskt momsgjald til EF at fara at koma at liggja um 25 mió. kr.

**i. Serskipanir í sambandi við EF-limaskap**

**Fyribils undantøk**

Í samráðingunum um EBS-skipanina verður samráðst um skiftisreglur og undantaksskipanir. Fyrr enn samráðingarnar eru lidnar, sæst úrslitið ikki.

Ísland hevur trygd í avtaluni um, at tað fær møguleika at avmarka møguleikarnar hjá arbeiðsmegi at koma frítt inn, um tað skuldi hent, at hetta frælsið bar í sær trupulleikar, ið ikki varð roknað við.

Í Íslandi er við nýggjari lóggávu møguleikar givnir fyri útlendskum beinleiðis íløgum og hjá útlendingum at stovna og keypa virki í Íslandi. Undantikið er tó fiskivinnan í víðari merking, t.m. eisini fiskavirki, Icelandair og loyvt er heldur útlendingum at eiga størri lut enn 25% í íslendskum bankum. Eingin ivi er um, at Ísland vil royna at fáa hesi undantøk frá EBS-frælsunum vird í EBS-skipanini.

Við limaskapi vildu samráðingar verið um at fingið ávísa tíð at tikið slíkar skipanir av.

**Støðug undantøk**

Støðugar undantaksskipanir vilja verða truplar at fáa.

Hjá Danmark hevur tað tó t.d. eydnast í 20 ár at avmarka rættin hjá øðrum EF-borgarum at keypa donsk summarhús.

SKJAL 1

Innihaldsyvirlit

1. Frágreiðing

2. Avrit av skrivi

30. apríl 1990 frá Føroya Landsstýri
15. august 1990 frá Føroya Landsstýri
7. november 1990 frá EF-arbeiðsbólkinum

3. Svarskriv frá

Búskaparstovuni
Føroya Banka
Fiskivinnustovuni
Landsfólkayvirlitinum
P/F Marr Fisher
Sjóvinnubankanum
Menningarstovuni

4. Svarskriv frá

Føroya Reiðarafelag

5. Svarskriv frá

Landsskúlafyrisitingini
SEV
Føroya Jarðarráð
Fróðskaparsetur Føroya
LISA
Ferðamannamiðstøð Føroya
Landsdjóralæknanum
Líkningarráð Føroya
Føroya Gjaldstovu
Tryggingarsambandið Føroyar
Postverk Føroya
Landfogeden på Færøerne
Rigsombudsmanden på Færøerne

6. Svarskriv frá

Føroya Ídnaðarfelag
Føroya Arbeiðsgevarafelag
Føroya Handverkarafelag
Føroya Arbeiðarafelag
Prísráð Føroya
Heilsufrøðiligu Starvsstovuni
Føroya Handverksmeistarafelag

7. Svarskriv frá

Søfartsstyrelsen
Landsverkfrøðinginum
Fiskirannsóknarstovuni
P/F Leif Mohr
P/F Bakkafrost
Føroya Bjór
SMS
P/F Elektron
Føroya Kommunufelag
E.O.Prent
P/F Poul Hansen - Heilsøla
BSV Pf. Bygningssnikkaravirkið
Føroya Prentsmiðjufelag

8. Svarskriv frá

Pf. Fiskavirkið
Føroya Fiskasølu
Føroya Havbúnaðarfelag
Í/F Havsbrún
Menningargrunni Ídnaðarins

**SKJAL 2**

INNIHALDSYVIRLIT - 3. PARTUR

ÚTGREININGAR FINGNAR FRÁ UDENRIGSMINISTERIET

TÁTTUR A:

1 a **Udenrigsministeriet. Notits af 8. januar 1991. Udredning vedr. Færøerne-EF. Specifikation af færøske ønsker. ad. (i). Beskrivelse af Færøernes situation indenfor Riget, men uden for EF. (Pkt. 1 - 8)**

1 b **Udenrigsministeriet. Notits af 10. januar og 11. januar 1991. Udredning vedr. Færøerne-EF. Specifikation af færøske ønsker. ad. (ii). Redegørelse for EF's politik på udvalgte områder af færøsk interesse. Specifikation af færøske ønsker ad hvs (iii), (iv) og (v), hvorledes vil hvs. en frihandelsaftale, en toldunion og EF-medlemskab påvirke Færøerne, samt (vi), evt. alternativer til medlemskab. (Pkt. A - T)**

2 **Skrivelse fra Udenrigsministeriet af 22. marts 1991 med oversigt over materiale fra ressortkontorer og fagministerier til besvarelse af spørgsmål fra Færøerne vedr. EF.**

Arbejdsministeriet (Vedr. pkt. N)
Fiskeriministeriet (Vedr. pkt. A)
Industriministeriet (Vedr. pkt. 8, B, C, E, H, O og R)
Justitsministeriet (Vedr. pkt. 1, 4 og S)
Kommunikationsministeriet (Vedr. pkt. G og K)
Kulturministeriet (Vedr. pkt. L)
Landbrugsministeriet (Vedr. pkt. D)
Miljøministeriet (Vedr. pkt. F)
Skatteministeriet (Vedr. pkt. I)
Socialministeriet (Vedr. pkt. 5)
Sundhedsministeriet (Vedr. pkt. 6)
Trafikministeriet (Vedr. pkt. E)
Undervisningsministeriet (Vedr. pkt. 7 og M)
Økonomiministeriet (Vedr. pkt. 2)
Udenrigsministeriet (Vedr. pkt. J)

3 **Arbejdsministeriet** (Pkt. N)

Svar frá Arbeiðseftirlitinum

Frágreiðing um arbeiðið í norðurlendskum arbeiðsbólki hvørs endamál er at tryggja norðurlendska ávirkan á EF-Tekniskar spurningar innan sjóvinnu.

Skriv til Arbeiðseftirlitið
Føroya landsstýri
Føroya landsstýri Deildin fyri fiskivinnu og aðra vinnu
Føroya Arbeiðarafelag

Redegørelse, der ønskes fra Arbejdsministeriet.

ad N. Arbejdsforhold m.v.

Notat af 15. marts 1991 fra Arbejdsministeriet vedr. arbejdsmiljø.
Notat af 1. marts 1991 fra Arbejdsministeriet vedr. ligestilling mellen kvinder og mænd.
Kort orientering af 1. marts 1990 fra Arbejdsministeriet om tilskudsmuligheder fra den Europæiske Socialfond.
Redegørelse af 5. marts 1991 fra Arbejdsministeriet (3. kontor) om arbejdsmarkedsforhold.
Redegørelse af 25. marts 1991 fra Arbejdsministeriet (1. kontor) om arbejdsmarkedsforhold.
Meddelelse fra EF-kommissionen af 5. december 1989 (Com 89/568/endelig udgave) om dets handlingsprogram om gennemførelsen af fællesskabspagten om de grundlæggende arbejdsmæssige og sociale rettigheder.

TÁTTUR B:

4 **Fiskeriministeriet** (Pkt. A)

Skriv til Føroya landsstýri Deildin fyri fiskivinnu og aðra vinnu
við avriti til Føroya Jarðarráð
Ferðamannamiðstøð Føroya
Orkuráðið
L/F Føroya Fiskasølu
Føroya Fiskimannafelag
Føroya Arbeiðarafelag
Føroya Ráfiskakeyparafelag
Føroya Reiðarafelag.

ad A. Fiskeri.

Notat af 1. marts 1991 fra Fiskeriministeriet om ressource- og bevaringspolitikken samt relationerne med tredjelande.

5 **Industriministeriet** (Pkt. 8, B, C, E, H, O og R)

Fyrispurningar frá Landsverksfrøðinginum, dagfestir 13. maj og 4. juni 1991 um útbjóðingar.

Skriv til Føroya landsstýri Deildin fyri fiskivinnu og aðra vinnu
Føroya Ídnaðarfelag
Føroya Banka
Sjóvinnubankan
Skriv til Landsbankan
Tryggingarsambandið
Føroya Sparikassa
Føroya landsstýri, Kára Petersen
Skriv til Føroya landsstýri Deildin fyri fiskivinnu og aðra vinnu
Skriv til Føroya landsstýri, Kára Petersen
Skriv til Føroya landsstýri, Kára Petersen
Føroya landsstýri Deildin fyri fiskivinnu og aðra vinnu
Føroya landsstýri, Jalgrím Hilduberg
Landsverkfrøðingurin
Føroya Ídnaðarfelag

ad B. Regionalpolitik.
ad C. Industripolitik
ad E. Transport
ad H. Bank- og finansvæsen
ad O. Konkurrenceregler m.v.
ad R. Turisme
ad 8. Etableringsret

Notat af 22. marts 1991 fra Industriministeriet om Industripolitik.
Notat af 3. april 1991 fra Industriministeriet om Selskabslovgivning.
Notat af 4. april 1991 fra Industriministeriet om Offentlige Indkøb.
Notat af 18. marts 1991 fra Industriministeriet om Regionalpolitik, Turisme, Transport, Bank- og Finansvæsen, Konkurrenceregler, Forbrugerområdet og Etableringsret.

TÁTTUR C:

6 **Justitsministeriet** (Pkt. 1, 4 og S)

Svar frá Landfogeden på Færøerne

Skriv til Føroya landsstýri Deildin fyri fiskivinnu og aðra vinnu
Føroya landsstýri, Jalgrím Hilduberg

Notat af 11. marts 1991 fra Skatteministeriet (9. kontor) om skatteharmoniseringen i EF og Kommissionens meddelelse af 20. april 1190 og retningslinier for selskabsbeskatning.

12 **Socialministeriet** (Pkt. 5)

Svar frá Almannastovuni

Skriv frá Almannastovuni

Redegørelse, der ønskes fra socialministeriet

ad 5. Socialsektoren

Skriv af 6. februar 1991 fra Socialministeriet vedr. udviklingen i EF og dennes påvirkning.
Skriv af 11. marts 1991 fra Socialministeriet om hvorledes udviklingen i EF på det sociale område kan tænkes at påvirke Færøerne.

13 **Sundhedsministeriet** (Pkt. 6)

Svar frá Sjúkrahússtjóranum

Skriv til Sjúkrahússtjóran

Redegørelse, der ønskes fra sundhedsministeriet

ad 6. Sundhedssektoren

Skriv af 4. april 1991 fra Sundhedsministeriet om levnedsmiddellovgivning og medicinsk udstyr m.v.

TÁTTUR E:

14 **Trafikministeriet** (Pkt. E)

Skriv dagf. 5. apríl 1991 frá Landsverkfrøðinginum

Skriv til Landsverkfrøðingin
Bileftirlitið
Atlantic Airways

Føroya landsstýri, Samskiftisdeildin
Føroyaleiðin, Faroe Line

Redegørelse, der ønskes fra Trafikministeriet.

ad E. Luftfartspolitik, Vejtransport, Havnetakster

Notat af 12. marts 1991 fra Trafikministeriet om hvilke konsekvenser EF's luftfartspolitik kan få for Færøerne, og om godskørsel.

Vedlagt: EF-retsakter vedr. lufttransport
Rådets forordning nr. 3164/76 om fællesskabskontingent for vejgodstransport mellem medlemsstaterne.
Rådets forordning nr. 4059/89 om betingelser for transportvirksomheders adgang til at udføre intern vejdodstransport i en medlemsstat, hvor de ikke er hjemmehørende.
Rådets direktiv nr. 74/561 om adgang til erhvervet med godstransport ad landevej i indenlandsk og international transport.
Rådets direktiv nr. 89/438 ændringer.
Lov nr. 851 om godkørsel og den tilhørende bekendtgørelse nr. 703 om godkørsel.

TÁTTUR F:

15 **Undervisningsministeriet** (Pkt. 7 og M)

Skriv dagfest 30. apríl 1991 frá Fróðskaparsetur Føroya.

Mødereferat mellem Undervisningsministeret og Landsskúlafyrisitingin den 14. febr. 1990.

Skriv til Landsskúlafyrisitingina
Føroya Læruráð

Redegørelse, der ønskes fra undervisningsministeriet.

ad 7. Undervisningssektoren
ad M. Forskning og uddannelse

Skriv fra 13. marts 1991 fra Undervisningsministeriet. Vedlagt kopi av skrivelse af 12. marts 1991 fra Erhvervsskoleafdelingen samt diverse materiale.

16 **Økonomiministeriet** (Pkt. 2)

Skriv til Fíggjar- og búskapardeildina, Føroya landsstýri

Redegørelse, der ønskes fra Det Økonomiske Sekretariat

ad 2. Valutaforhold

Notat af 20. marts 1991 fra Økonomiministeriet om eventuelle ændringer i de specielle færøske valutaforhold.

17 **Udenrigsministeriet** (Pkt. J)

Skriv til Føroya landsstýri Deildin fyri fiskivinnu og aðra vinnu

Skriv til P/F Shell
P/F Statoil
SEV

ad. J. Energi m.v.

Notits af 18. februar fra Udenrigsministeriet om EFs energipolitik.

18 **Udenrigsministeriet**

Skriv til Føroya Landsstýri Deildin fyri fiskivinnu og aðra vinnu
Føroya landsstýri, Jalgrím Hilduberg.

Notat af 27. marts 1991 om konsekvenser for hjemmestyret af eventuelt medlemsskab samt mulighederne for påvirkning af EF-beslutninger.

Notat af 9. april 1991 om generelle aspekter Færøerne-EF.

Notat (2. udkast) af 8. april 1991 med bilag om Færøerne-EF: Alternative tilknytningsformer.

Notits af 7. marts 1991 om Kommissionsforslag om særligt program til støtte for De Kanariske Øer.

Notits af 26. februar 1991 om Kommissionsforslag om særligt program til støtte for Madeira og Azorerne.

Notat af 12. februar 1991 om EF's indre marked og eventuelle virkninger

heraf for Færøerne.

Artikel af J. Ørstrøm Møller om Den danske EF-beslutningsproces i praksis.

Bilag fra 4. oktober 1991 om Memorandum fra den danske regering i forbindelse med forberedelserne til regeringskonferencerne om Den Politiske Union og om Den Økonomiske og Monetære Union.

Bilag fra 21. marts 1991 om danske forslag til traktattekster til fremlæggelse på Regeringskonferencen om Den Politiske Union.

19 **Udenrigsministeriet** (Pkt. T)

| | |
|---|---|
| Skriv fra | Landfogeden på Færøerne, Politimesteren |
| Skriv til | Føroya landsstýri, Jalgrím Hilduberg<br>Føroya landsstýri Deildin fyri fiskivinnu og aðra vinnu<br>Føroya Arbeiðarafelag<br>Føroya Landfúta, Fútaskrivstovuna<br>Føroya Lærurað<br>Landsskúlafyrisitingina |

ad T. Borgernes Europa.

Notat af 3. april 1991 fra Udenrigsministeriet om Borgernes Europa: Konsekvenser af eventuelt færøsk medlemskab i forhold til ikke-medlemskab

**INNIHALDSYVIRLIT - 4. PARTUR**

KUNNINGAR FRÁ EF-ARBEIÐSBÓLKINUM:


| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. kunning. | Alment um felagsmarknaðin | síða | 2 |
| 2. kunning. | Innari marknaðurin í EF, 1. partur | síða | 6 |
| 3. kunning. | Innari marknaðurin í EF, 2. partur | síða | 9 |
| 4. kunning. | Fiskivinnupolitikkurin hjá EF, 1. partur | síða | 11 |
| 5. kunning. | Fiskivinnupolitikkurin hjá EF, 2. partur | síða | 15 |
| 6. kunning. | EF og regionalpolitikkur tess | síða | 18 |
| 7. kunning. | EF og ídnaðurin | síða | 22 |
| 8. kunning. | Grein 7 í Rómarsáttmálanum | síða | 26 |
| 9. kunning. | Lóggávuheimildin í EF | síða | 29 |
| 10. kunning. | Landbúnaðurin í EF | síða | 33 |
| 11. kunning. | Europeiska gjaldoyrasamgongan | síða | 38 |
| 12. kunning. | Føroyar og EF, 1. partur | síða | 42 |
| 13. kunning. | Føroyar og EF, 2. partur | síða | 45 |
| 14. kunning. | Peningastovnarnir og EF | síða | 48 |
| 15. kunning. | Arbeiðsmarknaðurin og EF | síða | 51 |
| 16. kunning. | Ísland og EF/EFTA | síða | 58 |


ÚTGREINING FRÁ VALUTA- OG PRÍSRÁÐ FØROYA:


Handilskapping innan EF sambært Rómarsáttmálanum gr. 85-94 síða 65